# Kervisfrágreiðingin

**– ein kanning av bygnaðinum á føroyska fjarskiftismarknaðinum við Føroya Tele sum høvuðskervisveitara og tænastuveitara –**

22. oktober 2004

Umboðini í Kervisnevndini hava undirskrivað og handað hesa frágreiðing til landsstýrismanninum í vinnumálum, Bjarna Djurholm, tann 22. oktober 2004.

*Vegna*

| *Vinnumálaráðið* | *Føroya Tele* | *Hinar veitararnar* | *Fjarskiftiseftirlitið* |
|---|---|---|---|
| Hjørdis Gaard | Andras Róin | Ólavur Ellefsen | Jógvan Thomsen |
| Marni Jacobsen | Hjalgrím P. Hentze | Kristian Davidsen | Sigurð Ó. Vang |

# Innihaldsyvirlit


Innihaldsyvirlit ..... 3
Samandráttur og niðurstøða ..... 4
1. Inngangur ..... 7
 1.1 Fororð ..... 7
 1.2 Bakgrund ..... 8
 1.3 Arbeiðssetningur og skipan av arbeiðinum ..... 8
2. Fjarskifti í Føroyum ..... 10
 2.1 Frælsisgongdin ..... 10
 2.2 Reguleringsamboð og avtalur ..... 10
 2.3 Marknaðarstøðan og gongdin annars ..... 13
 2.4 Partaeigaraáhugamál ..... 17
 2.5 Samandráttur ..... 19
3. Veitingarvirksemi og kappingarfortreytir ..... 20
 3.1 Grundleggjandi fasilitetur og insitamentsástøði ..... 20
 3.2 Natúrlig einkafeløg, stórrakstrarfyrimunir ..... 21
 3.3 Samvirkisvirknaðir og loddrøtt samskipan ..... 22
 3.4 OECD ..... 22
 3.5 Regulering av fjarskifti ..... 24
 3.6 Samandráttur ..... 24
4. Empiri ..... 26
 4.1 ES ..... 26
 4.2 Bretland ..... 27
 4.3 Danmark ..... 28
 4.4 USA ..... 29
 4.5 Samandráttur ..... 30
5. Sjónarmiðini hjá umboðunum í Kervisnevndini ..... 31
 5.1 Føroya Tele ..... 31
 5.2 Fjarskiftiseftirlitið ..... 32
 5.3 Hinir veitararnir ..... 33
 5.4 Samandráttur ..... 34
6. Greining ..... 36
7. Keldur ..... 41
Appendiks ..... 43
 Appendiks A: Modellapparat ..... 43
 Appendiks B: Søgulig lýsing av lógarverkinum innan fjarskifti ..... 56
 Appendiks C: Konsessiónir ..... 58

# Samandráttur og niðurstøða

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, setti í februar 2003 eina nevnd at kanna bygnaðin á føroyska fjarskiftismarknaðinum við Føroya Tele sum høvuðskervisveitara og tænastuveitara. Kervisnevndin, sum hon hevur verið nevnd, hevur verið mannað við umboðum frá Føroya Tele (FT), Fjarskiftiseftirlitinum (FSE), KT-felagnum (sum umboð fyri hinar veitararnar) og Vinnumálaráðnum (VMR). Kervisnevndin fekk til uppgávu at lýsa fyrimunir og vansar við ávísum bygnaðarmodellum og at gera tilmæli um val av modelli ella modellum, sum farast kundi víðari við.

Tilgongdin við at frælsisgera (liberalisera) føroyska fjarskiftismarknaðin byrjaði, tá Løgtingið í 1997 samtykti løgtingslóg um fjarskifti. Síðan fjarskiftismarknaðurin í Føroyum bleiv frælsisgjørdur í 1999 er einkarætturin brotin á at kalla øllum fjarskiftistænastuøkjum. Við heimild í lóg um fjarskifti og konsessiónum verða ymisk reguleringsamboð nýtt at virka fyri at leggja karmar, sum skapa fortreytir fyri frælsari kapping. Av tí at FT framhaldandi hevur munandi størri marknaðarpart innan flestu fjarskiftistænastur, verður staðfest, at enn er ov tíðliga at siga, at kappingin er komin fyri at verða.

FT hevur tveir leiklutir á føroyska fjarskiftismarknaðinum – sum kappingarneyti hjá øðrum tænastuveitarum og sum útvegari av kervisatgeingi til hinar tænastuveitararnar. Felagið hevur ein dominerandi leiklut á føroyska fjarskiftismarknaðinum sum eigari av grundleggjandi undirstøðukervinum og við tí stóra marknaðarpartinum.

Fjarskifti er partur av teimum vinnugreinum, ið hava sín uppruna sum alment veitingarvirksemi sum eitt nú vatn-, gass- og ravmagnsleiðing, umframt jarnbreytir, flogvallir o.l. Felags fyri allar hesar vinnugreinar er, at tað almenna aftur í tíðini hevur átikið sær sum uppgávu at gera stórar íløgur í undirstøðukervið. Hesar íløgur vóru (og eru) so stórar og umfatandi, at tað samfelagsbúskaparliga ikki loysir seg, at onnur eisini gera somu íløgur í sambandi við, at marknaðurin verður frælsisgjørdur.

Við tíðini hava nógv lond frælsisgjørt teir marknaðir, ið tey fyrrverandi almennu veitingarvirkini høvdu einkarætt á. Tey undirstøðukervi, ið almennu veitingarvirkini høvdu ábyrdina av at reka og menna, kunnu nú í stóran mun metast sum *natúrligur einkarættur (monopol)* ella *grundleggjandi fasilitetir*, ið allir veitarar hava fyri neyðuni at hava atgeingi til fyri at kunna veita sínar tænastur í kapping við aðrar veitarar.

Fjarskifti er tann vinnugreinin innan almennu veitingarøkini, har fyrrverandi almennu einkafeløgini eru minst broytt – bygnaðarliga – í londunum rundan um okkum. Ognarligar sundurskiljingar av kervi frá tænastum eru ikki framdar í nøkrum OECD-landi, men aðrar bygnaðarligar broytingar eru tó framdar, so sum roknskaparlig sundurskiljing, sundurskiljing í geografisk økir, í lokal- og langfaratænastur og í fastnet og farfjarskifti.

Í londunum rundan um okkum hevur tað víst seg, at hóast fjarskiftismarknaðirnir eru vorðnir frælsisgjørdir, og tað í sambandi við frælsisgeringina hevur verið álagt fyrrverandi almennu fjarskiftiseinkafeløgunum at veita javnbjóðis atgeingi til kappingarneytar sínar, so standa fyrrverandi almennu einkafeløgini seg munandi betur í kappingini enn kappingarneytar teirra.

Frá ymiskum síðum hevur verið átalað, at fyrrverandi almennu fjarskiftiseinkafeløgini ikki vórðu sundurskild í sambandi við frælsisgeringina fyri at tryggja javnt atgeingi til teir *grundleggjandi* fasilitetirnar – fjarskiftisundirstøðukervið. Hesar átalur nema aloftast við trupulleikarnar hjá kappingarneytum at fáa atgeingi til kervið hjá fyrrverandi almenna einkafelagnum. Samstundis verður frá fleiri síðum ávarað ímóti at fremja ognarliga sundurskiljing (structural separation) av kervi frá tænastum, tí tað hervið verður framt skilnaður millum tveir partar, ið natúrliga hanga saman í einari fjarskiftisfyritøku, og tí fara samvirkisvirknaðir (synergieffektir) millum kervið og tænastur fyri skeytið, eins og m.a. ávísir stórrakstrarfyrimunir. Sum avleiðing av hesum verður ført fram, at vandi er fyri, at menningin av kervi og tænastum steðgar, og at brúkarin verður tann, ið kemur at svíða fyri hesum.

Í arbeiðinum við at útgreina hvørja ávirkan ymiskar bygnaðarbroytingar hava fyri føroyska fjarskiftismarknaðin, hevur Kervisnevndin sett upp seks ymisk modell av bygnaðarligum broytingum á FT við atliti til:

1. Kappingarstøðuna, herímillum mobilitet og gjøgnumskygni
2. Regulering, herímillum stabilar karmar
3. Kervið, herímillum optimala nýtslu og tøkniliga menning
4. Brúkaran, herímillum tænastur og prísir

Frá byrjan av vóru áskoðanirnar hjá pørtunum í Kervisnevndini á tey seks modellini sera ymisk, og hevur tað víst seg ógjørligt at semjast um eitt tilmæli at lata landsstýrismanninum. Serliga var áskoðanin hjá "hinum veitarunum" so at siga beint ímóti áskoðanini hjá FT.

Eftir at hava arbeitt við málinum í meira enn eitt ár, hevur tað ikki eydnast Kervisnevndini at gerast samd um, hvussu bygnaðurin á fjarskiftismarknaðinum í Føroyum eigur at vera, og tí skil verður einki samlað tilmæli latið landsstýrismanninum í hesi frágreiðing. Í staðin eru sjónarmiðini hjá pørtunum endurgivin beinleiðis í frágreiðingini.

VMR hevur ikki gjørt tilmæli um val av modelli ella modellum í hesi frágreiðing, av tí at VMR hevur havt formann og skrivara í nevndini, og tí hevur havt leiklutin sum samskipari og sum millumgongufólk.

FT mælir frá ognarligari sundurskiljing av FT í kervi og tænastur. Í staðin metir FT, at við seinastu umskipanini av virkseminum hjá FT er kervis- og tænastuparturin greitt atskildir við eini heilsøludeild, uttan at kervið herví er lagt í eitt felag fyri seg. FT vísur á, at um so verður, at hetta, hóast skipan av heilsøludeild, ikki er nøktandi – og at aðrir fyrimunir tala fyri hesum - kann tað gerast neyðugt / gagnligt, at FT ger sítt egna kervis-dótturfelag.

Hinir veitararnir kenna kappingarfyrimunin hjá FT av at eiga og reka kervið alstóran og mæla tí til, at kervið[1] verður ognarliga sundurskilt frá restini av FT. Hinir veitararnir meta eisini, at ein einskiljing av FT í núverandi líki hevði sett hinar veitararnar í eina sera óhepna støðu, tí at ein privatur eigari av FT ikki kann taka somu atlit, sum verandi almenni eigari kann.

[1] Hinir veitararnir mæla til at leggja passiva kervið saman við einum parti av aktiva kervinum í eitt ognarliga sundurskilt felag.

FSE mælir til ein móður/dótturfelagsbygnað, tó ikki sama bygnað, sum FT nemur við. Í staðin fyri at flyta kervispartin í eitt dótturfelag mælir FSE til, at tænastuparturin (alt tað, sum ikki kemur undir kervið) verður lagt í eitt nýtt dótturfelag hjá FT. Kervisparturin verður sostatt móðurfelag hjá nýggja tænastufelagnum, og fær kervisparturin/móðurfelagið eittans endamál: at menna kervið og selja kervistænastur til allar tænastuveitarar, heruppií egna tænastu-dótturfelagið. Við tilmæltu bygnaðarbroytingini av FT sær FSE onga forðing fyri, at farið verður undir at einskilja nýggja tænastu-dótturfelagið. Kervis-móðurfelagið kann verða einskilt óheft av tænastu-dótturfelagnum. Fyri at tryggja samfelagsligu atlitini, tá tað ræður um grundleggjandi fjarskiftisundirstøðukervið, mælir FSE tó mælt til, at ræðisrætturin hjá Føroya Landstýri í kervisfelagnum verður tryggjaður.

Tá samanum kemur, er kervið – óansæð bygnað – eyðkent við einkarættarstøðu, so spurningurin er, um hetta einkavirksemi skal verða partur av einari fjarskiftisfyritøku, ið veitir tænastur til endabrúkaran (FT í dag), ella um hetta einkavirksemi skal vera í einum felag fyri seg. Er tað betur, at einkavirksemið er knýtt at tænastupartinum hjá FT, ella er tað betur, at tað er í einum sundurskildum einkafelagi?




---

[3] UMTS (Universal Mobile Telecommunications System). Skipanin hevur við sær størri bandbreidd og møguleika fyri skjótari dátaflutningi við farfjarskifti.

# 1. Inngangur

## 1.1 Fororð

Karmurin um fjarskiftispolitikkin hjá landsstýrismanninum er løgtingslóg um fjarskifti og vinnu- og KT-vinnupolitikkurin. Karmarnir um fjarskiftið í Føroyum samsvara við karmarnar í Evropa í síni heild. Skipanin tekur støði í trúnni á, at frælsisgeringin av fjarskiftismarknaðinum og kappingin gagnar brúkaranum, so hesin fær hægri góðsku, lægri prísir og fleiri og áhaldandi nýggjar tænastur. Eisini byggir skipanin á ta fatanina, at kapping ikki tarnar íløgu- og menningarhugin í undirstøðukervið hjá fyrrverandi einkafeløgum.

Frælsisgeringin í Føroyum, sum farið varð undir í 1999, merkti, at einkarætturin varð brotin, og at nýggir veitarar fingu loyvi at reka fjarskifti. Kappingin innan fylgisveinatænastur byrjaði í 1999, fast internetsamband í 2000, fastnetstelefoni og uppringt internet í 2001 og farfjarskifti í 2002.

Lóggávan og umsitingin tekur støði í, at fyrrverandi einkafelagið varðveitir kervið, og at aðrir veitarar skulu hava atgeingi til kervið móti gjaldi. Orsøkin til kravið um atgeingi, er ásannanin av, at íløgur í kervið eru so mikið kostnaðarmiklar, at tað kann gerast ein forðing fyri, at nýggir fjarskiftisveitarar koma á marknaðin. Lóggáva og umsiting byggja á eina staðfesting av, at tað er lítið sannlíkt og heldur ikki samfelagsliga gagnligt, at nýggir veitarar bera kostnaðin av einum nýggjum kervi. Menningin av tráðleysari og kostnaðarlættari kervistøkni hevur tó havt við sær, at aðrir veitarar í ávísan mun hava lagt egið kervi í Føroyum, tá tað ræður um internet- og farfjarskiftiskervi.

Í flestu evropeisku londunum verða konsessiónir bodnar út móti gjaldi, tá talan er um avmarkað tilfeingi, eitt nú konsessiónir til UMTS[3] og aðrar frekvensir (tíddir). Landsstýrismaðurin hevur innan lógarkarmarnar umsitið konsessiónir til fjarskifti í Føroyum soleiðis, at lýkur umsøkjarin neyðugu krøvini, verður konsessiónin veitt. Á hendan hátt ynskir landsstýrismaðurin at skapa góðar fortreytir fyri, at aðrir veitarar koma á marknaðin og í mest møguligan mun taka burtur forðandi karmar um hesa vinnugrein. Eisini byggir politikkurin sum heild á, at íløgur í undirstøðukervið fara fram á privata marknaðinum.

Við tí endamáli at skapa góðar fortreytir fyri fjarskifti hevur landsstýrismaðurin gjørt av at geva kommunum, eigarafeløgunum o.ø. loyvi at reka fjarskifti á tilskilaðum økjum. Við løgtingslóg um stuðul til undirstøðukervið á útoyggjum er landsstýrismanninum heimilað at stuðla samskiftiskervið á útoyggjum ásannandi, at handilsliga grundarlagið fyri tílíkum íløgum, sum er, er avmarkað.

FT er kervisveitari til aðrar fjarskiftisfyritøkur umframt at vera tænastuveitari til endabrúkaran. Jú meiri/størri kapasitetur er á kervinum, ið FT selir til aðrar veitarar, jú harðari kapping verður um at veita tænastur til viðskiftafólkini. Ein grundleggjandi andsøgn er í skipanini, tá ið ein økt søla av kervi samstundis gevur økta kapping. Tvs. at spurningurin er, hevur FT áhuga í at selja meiri kervi til aðrar veitarar, tá økt kapping hevur við sær eitt samlað tap, hóast inntøkurnar av kervissøluni. Hendan andsøgnin undir verandi bygnaði ger tað neyðugt at hava lóggávu og umsiting, ið setir krøv til FT um ikki at taka atlit til øktu kappingina, tá atgeingið til kervið verður selt kappingarneytunum.

Ásannandi samfelagsliga týdningin av fjarskifti sum grundarstein undir menning og áhaldandi vinnuligum vøkstri, leggur landsstýrismaðurin áherðslu á støðugt at eftirmeta førda politikkin. Landsstýrismaðurin metir tað vera týdningarmikið at taka neyðugu stigini til at tillaga fjarskiftislóggávu, umsiting og bygnað, er tað neyðugt. Hetta til tess at tryggja framhaldandi menning av fjarskifti til gagns fyri borgarar og vinnu.

Havandi royndirnar í Evropa og her heima hevur landsstýrismaðurin tikið stig til at fáa nærri kanningar gjørdar av, um verandi skipan við serligari kappingarregulering av fjarskifti er nøktandi, og hvørt og í hvønn mun tað hevði verið ein fyrimunur, um FT verður broytt bygnaðarliga ella soleiðis at skilnaður verður ímillum kervi og tænastur. Landsstýrismaðurin ynskti, at bygnaðurin skuldi viðgerast, áðrenn stig verða tikin til heilt ella lutvíst at selja partapeningin í FT.

## 1.2 Bakgrund

Landsstýrismaðurin við vinnumálum, Bjarni Djurholm, setti í februar 2003 eina nevnd (Kervisnevndin) at kanna bygnaðin á fjarskiftismarknaðinum við FT sum høvuðskervisveitara og tænastuveitara. Kervisnevndin hevur verið mannað soleiðis:

| | |
|---|---|
| • Vinnumálaráðið (VMR) | Hjørdis Gaard, *formaður* |
| • Vinnumálaráðið (VMR) | Marni Jacobsen, *skrivari* |
| • Føroya Tele (FT) | Andras Róin |
| • Føroya Tele (FT) | Hjallgrím Hentze |
| • Fjarskiftiseftirlitið (FSE) | Jógvan Thomsen |
| • Fjarskiftiseftirlitið (FSE) | Sigurð Ó. Vang, *ráðgevi* |
| • KT-felagið (hinir veitararnir) | Ólavur Ellefsen |
| • KT-felagið (hinir veitararnir) | Kristian Davidsen, *varalimur* |

## 1.3 Arbeiðssetningur og skipan av arbeiðinum

Arbeiðssetningurin hjá Kervisnevndini

- at kanna hvørt og í hvønn mun verandi bygnaður á fjarskiftismarknaðinum, við FT sum høvuðskervisveitara og tænastuveitara í einum felagi, er besti karmur um fjarskiftismarknaðin í Føroyum. Metast skal um, um landið sum eigari av FT eigur at taka nøkur bygnaðarlig stig til at sundurskilja FT til tess at betra um møguleikarnar fyri burðardyggari og javnari kapping og samstundis tryggja skilagóða nýtslu av tilfeinginum. Kervisnevndin hevur til uppgávu at lýsa fyrimunir og vansar við ávísum bygnaðarmodellum, og at gera tilmæli um val av modelli ella modellum, sum farast kann víðari við.

Fyrilitini í kanningini eru m.a. :

- at eggja nýggjum veitarum at koma inn á føroyska fjarskiftismarknaðin og at verða verandi
- at skapa stabilar karmar
- at regulera minst møguligt
- at javnstilla fyrrverandi einkafelagið
- at skapa gjøgnumskygni
- at optimera kervið

Tá arbeiðssetningurin varð viðgjørdur, var semja um eisini at hava hesi fyrilit við í kanningini:

- bygnaðarlig ávirkan á tænastu- og prísstøðið hjá brúkarunum
- framhaldandi menning av undirstøðukervinum

VMR hevur ikki gjørt tilmæli um val av modelli ella modellum í hesi frágreiðing, av tí at VMR hevur havt formann og skrivara í nevndini, og tí hevur havt leiklutin sum samskipari og sum millumgongufólk.

GSM-kervið er ikki tikið við sum grundleggjandi undirstøðukervi í hesi frágreiðing. Hetta m.a. tí, at GSM-kervið ikki í sama mun hevur eyðkenni sum grundleggjandi fasilitetur. Til ber við ávísum íløgum innan lutfalsliga stutta tíð at røkka stórt tal av kundum, og kundasambandið er ikki so staðbundið sum t.d. í koparlinjunum í access-kervinum. T.d. hevði tað tikið nógv ár at grivið koparkaðalar niður í jørðina til eitt størri tal av kundum. Um ein fyritøka ynskir at veita fastnetstænastur, má hon fáa atgeingi til grundleggjandi kervið, meðan hetta ikki í sama mun ger seg galdandi fyri farfjarskiftistænastur.

## Frágreiðingarbygnaður

Frágreiðingin er skipað í 6 kapittlar, har ið fyrsti kapittul inniheldur fororð, greiðir frá bakgrundini fyri frágreiðingini, lýsir arbeiðssetningin umframt, hvussu arbeiðið hevur verið skipað.

Næsti kapittul er ein lýsing av fjarskifti í Føroyum, frælsisgeringstilgondini, reguleringsamboð og avtalur, og marknaðarstøðan tá ræður um fastnetsfjarskifti, uttanlandssamskifti, uppringt internetsamband, farfjarskifti, fast internet og innanlands leigulinjur (dátasamskifti). Eisini verða partaeigaraáhugamálini stutt lýst, og ræðisrætturin hjá Føroya landsstýri til undirstøðkervið verður viðgjørdur í sambandi við eina møguliga sundurskiljing av kervi og tænastum.

Í triðja kapittuli verða ymisk ástøðilig hugtøk lýst og sett í sambandi við fjarskifti, heruppií hugtakið grundleggjandi fasilitet og insitament, natúrlig einkafeløg og stórrakstrarfyrimunir, samvirkisvirknaðir og loddrøtt samskipan (vertikal integratión). Tilmæli og frágreiðingar frá OECD frá ávíkavist 2001, 2002 og 2003 um sundurskiljing verður viðgjørt, umframt er eitt brot um regulering av fjarskifti.

Fjórði kapittul fevnir um eina stutta lýsing av fjarskiftireguleringini í ES umframt av fjarskifti í Bretlandi, Danmark og USA.

Fimti kapittul lýsir sjónarmiðini hjá umboðunum t.e. hjá Føroya Tele Fjarskiftiseftirlitinum og hjá hinum veitarunum.

Sætti og seinasti kapittul er ein greining av verandi bygnaði, einari sundurskiljing av kervi og tænastum, markinum millum kervi og tænastur, ognarviðurskifti á kervinum og dótturfelagsmøguleikanum, umframt ein stutt perspektivering.

[6] Samantvinnað søla er, tá ymiskar tænastur, ið vanliga verða seldar einsæris verða seldar saman við einum avsláttri. Hetta ger tað tórført hjá veitarum at kappast, ið ikki hava samlaða útboð av tænastum.

# 2. Fjarskifti í Føroyum

Hesin kapittulin inniheldur eina lýsing av fjarskifti í Føroyum, frælsisgeringstilgondini, reguleringsamboð og avtalur, og marknaðarstøðan tá ræður um fastnetsfjarskifti, uttanlandssamskifti, uppringt internetsamband, farfjarskifti, fast internet og innanlands leigulinjur (dátasamskifti). Eisini verða partaeigaraáhugamálini stutt lýst, og ræðisrætturin hjá landinum til undirstøðkervið viðgjørdur.

## *2.1 Frælsisgongdin*

Tilgongdin við at frælsisgera føroyska fjarskiftismarknaðin byrjaði, tá Løgtingið í 1997 samtykti løgtingslóg um fjarskifti. Tað var tó ikki fyrr enn seinast í 1999, at verulig ferð kom á hesa tilgongd, tá ið aðrir veitarar enn FT eisini fingu konsessión og trinu inn á føroyska fjarskiftismarknaðin.

Endamálið við fjarskiftislógini er m.a.:

- at fjarskiftistørvurin verður nøktaður,
- at fremja skilagóða nýtslu av tilfeinginum og
- at skapa fortreytir fyri frælsari kapping á fjarskiftisøkinum.

Fjarskiftislógin staðfestir, at landið hevur einkarætt til fjarskifti í Føroyum. Fjarskiftislógin hevur tvinni meginhugtøk um atgeingi til at veita fjarskiftistænastur í Føroyum. Hitt fyrra er veitan av konsessión (fjarskiftisloyvi). Hitt seinra er frælsisgering.

Tá so marknaðurin er meira mentur, kunnu øki so líðandi verða frælsisgjørd, har allar áhugaðar fyritøkur, ið lúka nakrar nærri ásettar reglur, kunnu virka á frælsisgjørda marknaðarøkinum. Føroyar fingu fjarskiftislógina í 1997, nøkur ár eftir, at flestu grannalondini vóru farin í gongd við at tillaga fjarskiftisveitingar til marknaðarviðurskifti. Politikkurin hjá landsstýrismanninum síðan apríl 1999 hevur verið ein sokallaður "fyrri var – fyrri fær" (first come – first served) politikkur, har umsøkjarar, ið lúka nærri ásett krøv, umframt eftir tilmæli frá FSE, fáa tillutað konsessión frá landsstýrismanninum.

Eftir hesum leisti er einkarætturin nú brotin á at kalla øllum fjarskiftistænastuøkjunum, sí annars brot um marknaðarstøðuna og gongdina annars (s. 13).

## *2.2 Reguleringsamboð og avtalur*

Við heimild í lóg um fjarskifti og konsessiónum verða ymisk reguleringsamboð nýtt at virka fyri at leggja karmar, sum skapa fortreytir fyri frælsari kapping. At fjarskiftisvinnan verður regulerað við ymsum amboðum kemst av, at mett verður, at ávísar fordingar eru fyri, at nýggir veitarar sleppa inn á marknaðin.

Hesar fordingar koma av støðuni hjá FT sum fyrrverandi almennur stovnur við einkarætti til fjarskifti. Felagið hevur í upprunastøðuni fyrimunir, ið standast av, at farið varð frá einkarætti til kapping. Ein annar fyrimunur er, at felagið hevur ymsar bindingar í samfelagnum, sum týðandi keypari av vørum og tænastum. Harafturat er felagið eigari av fjarskiftiskervinum, og kann gagnnýta teir fyrimunir, ið standast av hesum.

Vanliga fáa fyrrverandi einkafeløg álagdar ávísar veitingarskyldutænastur, meðan nýggir veitarar bert fáa skyldistænastur álagdar, um teir gerast týðandi veitarar, ella um onnur viðurskifti gera tað neyðugt; eitt nú í sambandi við tilbúgving. Ein veitingarskyldutænasta hevur bæði vansar og fyrimunir við sær. Vansarnir eru, tá talan ikki er um handilsligt virksemi. Í dag hevur FT fastnetsfjarskifti og uppringt internet sum veitingarskyldutænastu, umframt aðrar tænastur til deyv og fjarskifti í sambandi við alarmsentralin. Í tann mun hendan skyldan ikki er í tráð við handilsætlanina hjá felagnum, er tænastan ein byrða. Fyrimunirnir av veitingarskyldutænastum eru m.a., at fólk kenna betur hendan veitaran, umframt at fyrrverandi einkafelagið verður ofta fatað sum tann tryggi veitarin kring alt landið av søguligum orsøkum og orsakað av veitingarskylduni.

## Fjarskiftiseftirlitið

Við lóg um fjarskifti varð eitt fjarskiftiseftirlit stovnað í 1997 til tess at skilnaður skuldi verða millum ognarskap og eftirlit, og til tess m.a. at savna neyðugu regulerings- og tøkniligu vitanina. Uppgávurnar hjá Fjarskiftiseftirlitinum eru sambært reglugerð fyri FSE frá 9. juli 1999 m.a. at virka fyri at fremja kapping innan fjarskifti, hava eftirlit við, at fjarskiftisveitarar halda og uppfylla teirra skyldur sambært konsessiónum og galdandi reglum annars, og at fáa semju í lag millum konsessiónshavarar í sambandi við sambinding og samskipan av almennum fjarskiftiskervum.

Álagt verður konsessiónshavarum at geva seg undir ótálmaða sambinding og samskipan av almennum fjarskiftiskervi og almennari fjarskiftistænastu. Um annar konsessiónshavari vil binda fjarskiftiskervið hjá sær uppí fjarskiftiskervið hjá viðkomandi, skulu partarnir gera sáttmála um samanbindingina og treytirnar fyri henni.

Amboðini at virka fyri frælsari kapping, ið higartil hava verið nýtt, eru treytir fyri prísáseting og almennar treytir fyri sambinding, kervisatgeingi og príseftirlit.

Høvuðstættirnir í eftirlitinum hjá FSE av prísum til endabrúkaran snúgva seg um:

1. Príseftirlit og herundir m.a. atlit sum:
   a. Samantvinnað søla[6] (boundling)
   b. Ránsprísáseting[7] (Predatory priceing)
   c. Prískroysting[8] (Price sqeezes)
2. Gjøgnumskygni

Prísir og avgjøld mugu ikki vera kappingaravlagandi og mugu ikki avlaga heildar útreiðslu- og inntøkubygnaðin. Hetta merkir at tað ikki er loyvt at krossstuðla til, frá og millum økir í kapping. Prísir og gjøld skulu verða gjøgnumskoðilig og miðast skal eftir veruligum kostnaði umframt rímuligum vinningi í tann mun, kapping er á økinum, og listaprísir skulu vera alment atkomuligir.

FSE skal góðkenna sáttmálar, sum konsessiónshavarar gera sínámillum um sambinding av fjarskiftiskervum, og skulu avsláttarskipanir eisini latast FSE til ummælis og góðkenningar.

[7] Ránsprísáseting er m.a. støðan, tá ein veitari við týðandi marknaðarstøðu yvir longri tíð selur eina tænastu til undir langtíðarmeðalkostnaðin av at veita tænastuna.
[8] Prískroysting er støðan, tá ein kervisveitari, sum eisini er tænastuveitari, selur tænastuna til ein prís, ið ger tað trupult ella als ikki lønsamt hjá einum tænastuveitara at selja somu tænastu.

Tá ræður um samskipan og sambinding av tænastum og kervum er meginreglan, at fyrst skulu partarnir samráðast upp til í mesta lagi 3 mánaðir, síðan kann annar av pørtunum biðja FSE koma uppí at royna at fáa semju í lag, og kann FSE eisini seta fram semingsuppskot. Eftir í mesta lagi 8 vikum kann annar av pørtunum krevja, at FSE tekur eina avgerð, ið síðan kann kærast til kærunevndina í fjarskiftismálum innan 4 vikur.

Higartil hevur FSE haft eini 30 mál til avgerðar/semings. Higartil eru 7 avgerðir hjá FSE innan hetta økið kærdar til kærunevndina í fjarskiftismálum.

## Kærunevndin í fjarskiftismálum

Avgerðir hjá fjarskiftiseftirlitinum kunnu skjótast inn fyri kærunevndina í fjarskiftismálum, sum tekur endaliga umsitingarliga avgerð í málinum.

Mál, sum kærunevndin hevur haft til viðgerðar, eru:

1. Kæra frá FT frá 26. sept. 2001 um, at FSE ikki hevði heimild til at góðkenna avsláttarskipanir hjá FT. Í avgerð frá 27. feb. 2002 gjørdi kærunevndin av, at kæran fall burtur, av tí at kærandi ikki lat við seg koma.
2. Kæra frá FT frá 15. januar 2002 um avgerð hjá FSE viðvíkjandi prísáseting av Backhaul Tórshavn - Tjørnuvík og atgeingi til støðina í Tjørnuvík. 8. mai 2002 gjørdi FSE av at taka málið upp til nýggja viðgerð vegna nýggjar upplýsingar í málinum. Í avgerð frá 26. august 2002 skrivaði Kærunevndin, at hon metti kæruna tikna aftur, av tí at FT ikki fasthelt kæruna.
3. Kæra frá FT frá 6. des. 2001 viðvíkjandi avgerð hjá FSE um samráðingar millum FT og TeleF um endurskoðan av "aftale om koblet samtrafik". Í skrivi frá 25. feb. 2002 ger Kærunevndin av, at málið fellur burtur, av tí at kærandi ikki kom við eini lýsing av málinum (t.e. sakarkrøv, grundgevingar v.m.).
4. Umbøn frá FT frá 14. okt. 2002 um uppafturtøku av kæru frá 6. des. 2001. FT tók umbønina aftur 11. des. 2003.
5. Kæra frá FT frá 7. okt. 2002 um ávegis avgerð hjá FSE frá 9. sept. 2002 um at FT ikki skuldi taka burtur mánaðargjaldið av haldi á uppringdum internetsambandi. Kæruavgerð tikin 12. mars 2004 staðfesti avgerðina hjá FSE
6. Kæra frá FT frá 14. nov. 2002 um ikki at geva avgerð hjá FSE um at áleggja dagbøtur støðgandi virknað. Kærunevndin tók avgerð 12. mars, og metti ikki, at tað var grundarlag fyri at taka støðu til kæruna.
7. Kæra frá FT frá august 2003 um avgerð hjá FSE frá 18. juli um Telehúski og Telebonus. Nevndin tók avgerð 7. juni 2004, sum broytti avgerðina hjá FSE og góðtók avsláttarskipanirnar.

## Avtalur um atgeingi til kervið

Hesar avtalur verða bodnar fram av teimum ymisku veitarunum:

### FT

1. Sambinding av internetryggum, sum er atgeingi til altjóða internetið
2. Koblaður samflutningur á fastnetinum PSTN/ISDN
3. Fast forskoyti og forskoyti til PSTN/ISDN
4. Innanlands leigulinjur
5. Uttanlands leigulinjur á FARICE-1 og CANTAT-3, við backhaul
6. Innanlands reiking innan farfjarskifti GSM-900
7. Samhýsing – mastrar/ hús kring um í Føroyum

8. Tænastuavtalur (hald v.m.) á fastnetinum PSTN
9. Svart fipur atgeingi
10. Rátt kopar – shared Access
11. CNA-tænasta (Changed number announcement)
12. Bitstream Access ADSL

### Kall

1. Sambinding av internetryggum, sum er atgeingi til altjóða internetið
2. Innanlands leigulinjur
3. Samhýsing – mastrar/ hús kring um í Føroyum
4. CNA-tænasta (Changed number announcement)

### Teletech

1. Samhýsing – mastrar/ hús kring um í Føroyum
2. Innanlands leigulinjur

### El&Tele

1. Sambinding av internetryggum, sum er atgeingi til altjóða internetið

## 2.3 Marknaðarstøðan og gongdin annars

Til tess at lýsa marknaðarstøðuna við ársskiftið 2003/2004 verður støði tikið í Ársfrágreiðingini hjá FSE fyri 2003 (FSE, 2004).

Á vári 2004 vóru tað 5 ár síðan, tær fyrstu konsessiónirnar til fjarskifti vórðu veittar. Síðan er kapping komin so líðandi á at kalla øllum tænastuøkjum og hevur hetta viðført tænastumenning og lægri prísir. Menningin innan fjarskifti hesi árini sæst aftur í prístalinum. Fjarskifti telur 4,6% í prístalsútrokningini, ið byrjaði í 2001. Vísitalið fyri fjarskifti liggur á 83 fyri 2004, ið er eitt tað lægsta í útrokningargrundarlagnum. Hetta er ein ábending um, at prísgongdin er tann, at prísirnir lækka á fjarskiftisveitingum[9].

Umsetningurin á føroyska fjarskiftismarknaðinum í 2003 viðvíkjandi virksemi, ið krevur konsessión, var umleið 360 mió kr. Føroyski fjarskiftismarknaðurin er í løtuni ikki í einari vanligari kappingarstøðu. Hóast kapping er komin á flestu økjum, so hevur FT í løtuni eina sera sterka marknaðarstøðu á flestum tænastum, umframt at felagið fíggjarliga er nógv tað sterkasta felagið á marknaðinum við eini eginogn uppá uml. 294 mió kr.

Vøksturin í fastnetfjarskifti er nú vendur til eina spakiliga minking, meðan farfjarskifti hevur verið í støðugum vøkstri seinnu árini. Eisini økist útbreiðsla og nýtsla av háferðar- og breiðbandsinterneti[10] so sum ADSL[11] og FWA[12].

---

[9] www.hagstova.fo.

[10] Breiðsbandskervi merkir her flutningsferð yvir 2 Mbit/s. Háferðakervi merkir møguleiki fyri flutningsferð úr 128 kbit/s. Í summum londum er greiningin øðrvísi, t.d. er tað vanligt í USA at nevna flutningsferð størri enn 128 kbit/s sum breiðband.

[11] ADSL (Assymetric Digital Subscriber Line). Grundleggjandi kervið verður nýtt til at veita breiðband til viðskiftafólkini.

[12] FWA (Fixed Wireless Access). Talan er um tráðleyst internet, sum aðrir internettænastuveitarar enn FT og Kall veita í ávísum geografiskum økjum í Føroyum.

## Fastnetsfjarskifti

Tveir veitarar eru innan fastnetfjarskifti; Føroya Tele og Kall.

*Marknaðarpartur pr. 1. juli 2004, 1. januar 2004 og 1. januar 2003*

| | 1. juli 2004 | | 1. jan. 2004 | | 1. jan. 2003 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | *Tal av haldum* | *Marknaðar-partur* | *Tal av haldum* | *Marknaðar-partur* | *Tal av haldum* | *Marknaðar-partur* |
| FT | 19.105 | 79 % | 19.291 | 79 % | 20.558 | 84 % |
| Kall | 5.100 | 21 % | 5.041 | 21 % | 3.850 | 16 % |
| *Tilsamans* | 24.205 | 100 % | 24.292 | 100 % | 24.408 | 100 % |

Kapping á hesum øki byrjaði í januar 2001. Sambært hagtølunum omanfyri er fyrrverandi einkarættarstøðan hjá FT nú minkað, og hevur Kall umleið 21% av marknaðinum fyri hald og áleið tað sama fyri innanlands ferðsluminuttir.

Príslegan er á einum rímuligum og sambærligum støði við okkara grannalond.

## Uttanlandssamskifti

FT og Kall veita uttanlandstelefonitænastur til almenningin. Hvat viðvíkur uttanlandssamrøðum er lutfallið, at FT hevur 74% og Kall 26%. Príslegan í Føroyum fyri uttanlandssamskifti er á sama støði sum príslegan í hinum norðurlondunum, Ísland undantikið, prísirnir har eru munandi lægri.

Møguleikarnir fyri uttanlandssamskifti eru fylgjandi:
1. Sjókaðalin CANTAT-3
2. Sjókaðalin FARICE-1[13]
3. Fylgisveinar

Ein sera týðandi fortreyt hvat viðvíkur menning av samfelagnum og kapping innan fjarskifti í Føroyum eru samskiftismøguleikarnir við útheimin. Á vári 2004 varð FARICE-1 tikin í nýtslu.

Tøkniliga livitíðin hjá CANTAT-3 skipanini er í útgangsstøðinum sett til 2017, meðan tað tó má metast, at búskaparliga livitíðin er nakað styttri; møguliga longu í 2007-2009 kann væntast, at samtakið, ið stendur fyri kaðalinum, fer at steðga samstarvinum. Verður hetta gjørt, kann tað hugsast, at føroysk og íslendsk feløg keypa partin av kaðalinum í norðurhøvum fyri at tryggja tvístreingjað sjókaðal samskifti. Leysligar ætlanir eru í Íslandi um ein FARICE-2 kaðal innan eini 5-8 ár. Eisini í Føroyum verður arbeitt við forkanningum av, hvussu veitarar í Føroyum á bestan hátt kunnu leggja nýggjan kaðal til meginlandið innanfyri 5-8 ár.

## Uppringt internetsamband

Í verandi støðu eru tveir veitarar av uppringdum internetsambandi Føroya Tele og Kall.

[13] FARICE er eitt heilsølukervisfelag og tók felagið í februar 2004 ein nýggjan kaðal millum Ísland og Skotland, umvegis Føroyar, í nýtslu. Eigarar av Farice Hf eru FT, Landsimi Islands, Ríkisstjórn Íslands, umframt onnur feløg í Íslandi og Føroyum.

*Marknaðarpartur tann 1. juli 2004, 1. januar 2004 og 1. januar 2003*

| | 1. juli 2004 | | 1. jan. 2004 | | 1. jan. 2003 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | *Tal av haldum* | *Marknaðar-partur* | *Tal av haldum* | *Marknaðar-partur* | *Tal av haldum* | *Marknaðar-partur* |
| FT | 7.721 | 78 % | 8.004 | 79 % | *7.802 | 75 % |
| Kall | 2.150 | 22 % | 2.070 | 21 % | 2.650 | 25 % |
| *Tilsamans* | 9.871 | 100 % | 10.074 | 100 % | 10.452 | 100 % |

*Talið av haldum, t.v.s at fyrivarni skal takast fyri, at møgulig óaktiv hald eru tald við.

## Farfjarskifti

Tveir veitarar eru av farfjarskifti; FT og Kall. Í november 2002 kom Kall á marknaðin við farfjarskifti. Í fyrsta umfari avmarkað til talitíðarkort og í øðrum føri við vanligum haldi í mars 2003. Hetta verður gjørt partvíst við egnum kervi og lutvíst á kervinum hjá FT gjøgnum eina sonevnda innanlands reikingaravtalu.

*Marknaðarpartur tann 1. juli 2004, 1. januar 2004 og 1. januar 2003*

| | 1. juli 2004 | | 1. jan. 2004 | | 1. jan. 2003 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Talutíð** | *Tal* | *Marknaðar-partur* | *Tal* | *Marknaðar-partur* | *Tal* | *Marknaðar-partur* |
| FT (talutíð) | 13.734 | 69 % | 14.478 | 72 % | 14.144 | 83 % |
| Kall (talutíð) | 6.300 | 31 % | 5.610 | 28 % | 2.900 | 17 % |
| *Tilsamans* | 20.034 | 100 % | 20.088 | 100 % | 17.044 | 100 % |
| | | | | | | |
| **Hald (ikki talutíð)** | | | | | | |
| FT | 14.569 | 85 % | 14.601 | 87 % | 16.252 | 100 % |
| Kall | 2.600 | 15 % | 2.098 | 13 % | - | - |
| *Tilsamans* | 17.169 | 100 % | 16.699 | 100 % | 16.252 | 100 % |
| | | | | | | |
| NMT-450 - FT | 1.153 | 100 % | 1.239 | 100 % | 1.441 | 100 % |

Marknaðarbýtið er soleiðis, at FT hevur 77% og Kall 23% av fartelefonhaldunum í Føroyum.

Príslegan á farfjarskifti er sambærlig við prísstøðið í grannalondunum, við undantaki av Danmark, ið liggur væl lægri. Farfjarskiftiskervið røkkur 98% av øllum íbúgvunum í Føroyum. Kall hevur lutfalsliga minni av farfjarskiftisferðsluni enn tal á haldum.

## Fast internetsamband og innanlands leigulinjur (dátasamskifti)

Í Føroyum eru fleiri veitarar innan fast internetsamband, FT og Kall veita ADSL, og aðrir internettænastuveitarar veita FWA (tráðleyst samband).

*Marknaðarpartur tann 1. juli 2004, 1. januar 2004 og 1. januar 2003*

| | 1. juli 2004 | | 1. jan. 2004 | | 1. jan. 2003 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | *Tal* | *Marknaðar-partur* | *Tal* | *Marknaðar-Partur* | *Tal* | *Marknaðar-partur* |
| Føroya Tele | 1500 | 73,0 % | 880 | 64 % | 357 | 49,6 % |
| Teletech | 240 | 11,7 % | 215 | 16 % | 160 | 22,2 % |
| El & tele | 154 | 7,5 % | 133 | 10 % | 102 | 14,2 % |
| Atlantic Online | 48 | 2,3 % | 52 | 4 % | 46 | 6,4 % |
| Svínoy & Fugloy | 40 | 1,9 % | 40 | 3 % | 40 | 5,6 % |
| Kollnet | 37 | 1,8 % | 27 | 2 % | - | - |
| Hansoft | 35 | 1,7 % | 24 | 2 % | 15 | 2,1 % |
| *Tilsamans* | 2054 | 100 % | 1384 | 100 % | 720 | 100 % |

Marknaðarparturin hjá FT í juli 2004 er 71%, Teletech og El&Tele hava ávíkavist 11% og 7%, meðan aðrir veitarar hava minni marknaðarpart og virka á færri økjum í Føroyum.

Umleið 90% av húsarhaldunum í Føroyum hava møguleikan at fáa háferðar- og/ella breiðbandsinternet. Tráðleysi dekningurin spennir um áleið 60%, ADSL umleið 70%.

Seinasta hálvárið hevur verið ein vøkstur í talinum av føstum internetsambandi uppá uml. 92%. FT hevur fingið størsta partin av vøkstrinum.

Í dag hava 5% av íbúgvunum í Føroyum fast internetsamband, og væntar FSE, at talið verður umleið 7-8% við ársenda 2004. Í Danmark og í Íslandi er útbreiðslan ávíkavist umleið 17% og 16%.

Nýggju veitararnir leggja og seta upp egið undirstøðukervi, fyrst og fremst loftbornar skipanir av slagnum accessnet FWA (fixed wireless access) umframt fastar linjur.

## Internet í útjaðaranum og á útoyggj

Í desember 2001 tók landsstýrismaðurin í samskiftismálum avgerð um at veita eigarafeløgum o.l. konsessión til at veita fjarskifti í avmarkaðum øki, avmarkað til kringsvarpsnet og internetveitingar. Fleiri konsessiónir eru veittar, og aðrar eru møguliga á veg.

Í KT-vinnupolitikkinum verður miðað ímóti, at allir føroyingar innan 2004 skulu hava atgeingi til háferðar- og ella breiðbandskervi. Samanlagt hava umleið 90% av føroyingum henda møguleika í løtuni. Sum útlitini eru í løtuni, væntar FSE, at dekningurin verður um 95% við ársenda 2004. Fyri at handilsligt grundarlag skal vera hjá einum veitara at seta upp útgerð krevst í øllum førum eitt ávíst minsta tal av kundum. Annar møguleiki er, at fólk á staðnum taka seg saman um eina felagsloysn, eitt nú sum tykissamfelagið Svínoy-Fugloy.

Av útoyggjunum hava Svínoy og Fugloy eina felagsinternetloysn[14]. Løgtingslóg um at veita stuðul til infrakervið á útoyggj heimilar stuðul til íløgur í breiðband á útoyggj. Landsverk leggur í løtuni breiðband til Mykinesar og Hests kommunu. Eftir resta so Dímun, Kallsoy og Skúvoy, umframt Gásadalur. Tveir veitarar í Havnini røkka Nólsoynna.

[14] Kommunurnar hava sama við VMR staðið fyri hesi verkætlan, ið ein royndarverkætlan undir KT-ætlanini hjá VMR. Tráðlest internet varð lagt millum húski í Svínoy við felags internetsambandi av oynni. Seinni varð Fugloy knýtt í internetið.

Sambært fylgiskjali 3 í konsessión til FT frá 15. apríl 1999, hevur FT veitingarskyldu á vanligum fastnetfjarskifti og ISDN við nærri treytum. Tað er vanligt, at størsti veitarin á einum marknaði verður álagdur eina veitingarskyldu. Hvat henda skylda kostar FT, er eingin uppgerð ella meting gjørd av. Samanumtikið hevur útjaðarin sum heild nøktandi fjarskiftistænastur tá ræður um fastnetsamskifti, uppringt internet og farfjarskifti, men ikki innan fastar internetveitingar. Eftir ætlan verður fast internet veitt útoyggjunum innan 2006.

## 2.4 Partaeigaraáhugamál

Landið eigur allan partapeningin í FT, sum hevur latið 3 mió kr. í konsessiónsgjaldi í 2001 og 2002. Í 2004 lat FT 11 mió kr. í vinningsbýti, sum er fyrsta árið, FT hevur latið vinningsbýti til landið. Hóast landið eigur allan partapeningini í FT, er ávirkanin avmarkað til at taka avgerðir á aðalfundinum, meðan nevnd og leiðsla hava alla leiðsluna um hendið. Nevndarlimirnir eru ikki bundnir av øðrum ásetingum enn teimum, sum viðtøkur og lógin áseta, umframt tær avgerðir, sum við viðtøkum og lógum, verður álagdar aðalfundinum at taka.

Tá mett verður um, hvørjar landsfyritøkur mælt verður til at einskilja, verður støði tikið í treytunum, at fyritøkan framleiðir eyðsýniligar marknaðarbarar ágóðar, og at fyritøkan hevur munandi virði (Løgmansskrivstovan, 2001). Treytin um marknaðarbari merkir, at landsfyritøkan framleiðir ágóðar, sum hóska til handil á marknaði, sum ikki hevur týðandi marknaðarbrek, og um marknaðarbrek eru, at neyðug skipan er fingin í lag.

Í sambandi við eina einskiljing av FT hevur landið m.a. áhuga í framhaldandi at tryggja kapping og í at fáa inntøkur til landskassan burturúr søluni. Landið hevur í tí sambandi ein áhuga í at fáa sum mest fyri søluna av partapeninginum í FT.

Munurin millum almenna partafelagið og eitt einskilt FT er, at ikki ber til aftaná at taka virðir frá felagnum uttan móti endurgjaldi. Tað verður trupult at sundurskilja kervið við lóg, eftir at felagið er einskilt, tí talan tá verður um at gera inntriv í ognarrættin hjá einum privatum felag.

Landið kann varðveita sín avgerðarrætt í FT við at einskilja í mesta lagi 49%; tó krevst ein kvalifiseraður meirluti, sum er í minsta lagi 2/3 av partabrøvunum, til at broyta viðtøkurnar. Landið kann við meirilutanum av partabrøvunum í felagnum á aðalfundinum kann taka avgerð um ávís stig, sum kunna virka fyri at betra um atgeingið til kervið. Tá ber tó illa til seinni at taka kervið úr felagnum, um kappingar og samfelags atlit tala fyri hesum, av tí at talan tá helst verður um ognartøku.

Verða bygnaðarbroytingar framdar, soleiðis at kervið og tænastur liggja í ymsum feløgum, og farið verður undir at einskilja FT, kann landið hava áhuga í at varðveita ræðisrættin til kervispartin av felagnum, um mett verður, at fjarskiftislógin ikki í nóg stóran mun tryggjar fortreytir fyri kapping. Verður gjørt av at sundurskilja kervið frá tænastum og bert einskilja tænastupartin kann væntast, at landið fær munandi minni pening burturúr søluni, enn um felagið verður einskilt samlað. Fyri tað fyrsta umboðar kervið eitt munandi materielt virði. Harumframt vilja kappingarligu fyrimunirnir hjá einum einskildum eigara av at eiga og hava ræðisrættin til undirstøðukervið, samstundis sum kappast verður um tænastuveiting, hava eisini eitt virði.

Verður eitt kervisfelag skipað, er neyðugt m.a. at tryggja, at hetta kervisfelag ikki átekur sær annað virksemi, eitt nú at verða tænastuveitari. Eisini má gerast greitt, um forðingar skulu setast fyri, at partabrøvini kunnu seljast øðrum, ella at aðrir partaeigarar koma uppí felagið við kapitalhækking ella lagt verður saman við øðrum felagi.

Verður avgerðarrætturin í kervisfelagnum tryggjaður við, at meirilutin verður varðveittur, kann hetta gerast soleiðis, at landið fær ognarrættin til meirilutan. Avleiðingin er, at kervisfelagið verður sundurskilt frá FT, hóast FT varðveitur nøkur partabrøv. Tá ræður um inntøkur burtur úr sølu av partapeninginum, fer hesin møguleikin væntandi at hava við sær stóra ávirkan á inntøkuna, soleiðis at landskassin fær minni burturúr.

Fáa ognarviðurskiftini hjá landinum eina sonevnda "Golden share" (tað gylta partabrævið), merkir tað, at landið fær serlig rættindi. Hesi rættindi kunna eitt nú vera, at landið hevur vetorætt í ávísum avgerðum, og at felagið ikki kann fremja ávísar avgerðir uttan landið fyrst hevur viðgjørt og góðtikið tær. Fyrimunurin er, at hóast landið, við at selja síni partabrøv, missir ávirkan, kann tað varðveita stóra ávirkan á hendan hátt. Í so máta minnir hetta um lógarreguleringsmøguleikan, har vansin er, at tað kann verða torført at tryggja sær, at øll týðandi viðurskifti eru við. Alt eftir hvussu nógvar ásetingar eru um serlig rættindi til tað gylta partabrævið, fer tað at hava eina neiliga ávirkan á prísin fyri partabrøvini í FT.

Leggjast skal afturat, at ES dómstólurin hevur sett til síðis fleiri tílíkar avtalur, sum geva serrættindi til ávísar partabrævaeigarar, ið limalondini hava gjørt í sambandi við einskiljingar. Føroyar eru ikki partur av ES, tó má hetta havast í huganum, um so er, at Føroyar seinni gerast limir ella gera avtalu við ES, har hesar reglur verða galdandi.

Annar møguleiki er, at landið hevur keypsrætt til kervið. Treytin er tá, at kervið liggur í serstøkum felagi, at einki annað virksemi verður í hesum felagi, og at partar av kervinum ikki verða tiknar burturúr. Prísurin fyri keyp av kervinum kann vera fastur prísur ella ein fastur lykil fyri, hvussu prísurin verður ásettur. Talan eigur at vera um eina greiða prísáseting, soleiðis at íleggjarar kenna hesa fyritreyt. Ein tílíkur rættur kann verða galdandi í óavmarkaða ella avmarkaða tíð.

Val av prísmodelli eigur at verða tengt at sannlíkindunum fyri, at landið keypir kervið og at inntøkumissinum, sum stendst av, at íløguhugurin minkar orsakað av valda modellinum. Møguleiki er, at landið bert varðveitur keypsrætt í eitt nærri ásett áramál, og at keypið fer fram til tað handilsliga virði, ið kervið hevur til ta tíð. Virðið kann verða ásett av óheftum sakkunnleika. Vansin er, at hetta setur stór krøv til játtan á fíggjarlógini, tá keypið skal fara fram.

Um tænastuparturin hjá FT varð skipaður sum dótturfelag undir kervispartinum, hevði verið møguligt at einskilt FT-tænastur heilt ella lutvíst, uttan at atlit verða tikin til møguleikan at keypa kervið aftur.

## 2.5 Samandráttur

Tilgongdin við at frælsisgera føroyska fjarskiftismarknaðin byrjaði, tá Løgtingið í 1997 samtykti løgtingslóg um fjarskifti. Tað var tó ikki fyrrenn seinast í 1999, at verulig ferð kom á hesa tilgongd, tá ið aðrir veitarar enn FT fingu konsessión og trinu inn á føroyska fjarskiftismarknaðin. Eftir hesum leisti er einkarætturin nú brotin á at kalla øllum fjarskiftistænastuøkjunum.

Við heimild í lóg um fjarskifti og konsessiónum verða ymisk reguleringsamboð nýtt at virka fyri at leggja karmar, sum skapa fortreytir fyri frælsari kapping. At fjarskiftisvinnan verður regulerað við ymsum amboðum kemst av, at mett verður, at ávísar forðingar eru fyri, at nýggir veitarar kunna koma á marknaðin. Tá farið var frá einkarætti til kapping, hevði FT vegna lutfalsligu støðd sína framvegis eina einkarættarstøðu, og hartil fyrimunir sum eigari av undirstøðukervinum til fjarskifti, og kundi gagnnýta hesar.

Við lóg um fjarskifti varð Fjarskiftiseftirlitið stovnað til tess at skilnaður skuldi verða millum eigaran og eftirlitið og til tess m.a. at savna neyðugu regulerings- og tøkniligu vitanina. Á vári 2004 vóru tað 5 ár síðan, at tær fyrstu konsessiónirnar til fjarskifti vórðu veittar. Føroyski fjarskiftismarknaðurin er eyðkendur við, at hóast kapping er komin á flestu økjum, so hevur FT í løtuni eina sera sterka marknaðarstøðu á flestu tænastuøkjum, umframt at felagið fíggjarliga er nógv tað sterkasta felagið á marknaðinum.

landið kann varðveita ávísan avgerðarrætt í FT við at einskilja í mesta lagi 49% av partabrøvunum, av tí at landið við meirlutanum av partabrøvunum í felagnum á aðalfundinum kann taka avgerð um ávís stig, sum kunna virka fyri at betra verður um atgeingið til kervið.

Mett verður, at landið í sambandi við einskiljing av FT framhaldandi kann tryggja sær ognarrættin til fjarskiftiskervið eftir tveimum leistum, antin við lóg, herundir við ognartøku, ella við avtalu við keyparan. Avtalumøguleikarnir fevna um, at landið varðveitur meirilutan í kervisfelagnum, hevur eitt gylt partabræv ella afturkeypsrætt til kervið, herundir møguliga til fastan prís. Niðurstøðan í metingini er, at tað greiðasta er at gera avtalu um afturkeyp frammanundan heldur enn at lýta á inntriv við lóg og ognartøku.

Vil landið tryggja sær fullan ræðisræ ttin til kervið, um tað verður lagt í eitt dótturfelag og farið verður undir at einskilja FT, er tað greiðast at gera avtalur frammanundan, ístaðin fyri við lóg og ognartøku at seta avmarkingar, sum ikki eru av generellum slag. Spurningurin er, hvussu landið tryggjar seg samstundis sum, at partabrøvini kunna seljast til best møguligan prís.

Um tænastuparturin hjá FT hinvegin verður lagdur í eitt dótturfelag undir kervispartinum, hevði tað verið møguligt at einskilt FT-tænastufelagið heilt ella lutvíst, uttan at missa ræðisræ ttin til kervið.

# 3. Veitingarvirksemi og kappingarfortreytir

Ymisk ástøðilig hugtøk verða viðgjørd, sum eru viðkomandi fyri eina viðgerð av bygnaðinum innan fjarskifti í Føroyum. Ástøðiligu hugtøkini eru m.a. grundleggjandi fasilitetur og insitamentsástøði, natúrlig einkafeløg og stórrakstrarfyrimunir, samvirkisvirknaðir og loddrættar samskipanir. Eisini verða frágreiðingar frá OECD (OECD, 2001, 2002 og 2003) um ognarliga sundurskiljing viðgjørdar, umframt, at eitt brot er um regulering av fjarskifti, har jaligar og neiligar avleiðingar av fjarskiftisregulering verða viðgjørdar.

## *3.1 Grundleggjandi fasilitetur og insitamentsástøði*

Fjarskifti hevur sum vinna sín uppruna sum partur av tí virksemi, sum londini í Evropa og aðrastaðni í vesturheiminum fóru undir so hvørt, sum ídnaðarsamfelagið mentist í 19. og 20. øld. Í hesum tíðarskeiði vórðu alt fleiri veitingarvirki sett á stovn, hvørs uppgáva var at veita borgarunum í einstøku londunum almennar veitingartænastur so sum kloakk- og vatnleiðing, ravmagn, jarðargass, fjarskifti, jarnbreytir o.t. Á enskum verða tænasturnar hjá hesum virkjum kallaðar "Public Utilities", og kunna á føroyskum umsetast til "almennar veitingar". Tey almennu veitingarvirkini høvdu aloftast einkarætt til at veita teirra tænastur, og gjørdu tær stórar og drúgvar íløgur í undirstøðukervi, fyri at gera tað møguligt at veita áløgdu tænasturnar til borgararnar í teimum einstøku londunum.

Staðfestingar av, at nógv av nevnda veitingarvirkseminum var vinnuligt, heldur enn alment virksemi, og atfinningar við atliti til kapping hava verið atvoldin til, at lond fóru undir at frælsisgera marknaðir, ið almenn veitingarvirki høvdu havt einkarætt á. Almenna veitingarvirksemið varð lagt í partafelag og farið varð seinni undir einskiljingartilgongdir.

Tá tað umræður tænastuframleiðslu hevur hugtakið "grundleggjandi fasilitetur (Essential Facility) verið nýtt í sambandi við flutning av menniskjum, ognum, orku ella upplýsingum. Í hesum førum er tað undirstøðukervið ella flutningsvegirnir, ið hava verið neyðugir fyri at kunna bjóða flutnings- ella samskiftistænastur til endabrúkaran, ið eru at meta sum grundleggjandi fasilitetir.

Innan búskaparfrøðina verður hugtakið grundleggjandi fasilitetur nýtt um ein framleiðslufaktor, ið er umráðandi fyri at kunna framleiða eina givna endavøru.

Nógvir faktorar verða nýttir í einari framleiðslu, summir meira umráðandi enn aðrir. Spurningurin er, hvørjir faktorar eru so umráðandi fyri framleiðsluna, at teir kunnu kallast "grundleggjandi fasilitetir". Tað er trupult at finna fram til eina nágreiniliga definitión (allýsing) av hugtakinum grundleggjandi fasilitetur. Á einari ráðstevnu hjá OECD varð ført fram um grundleggjandi fasilitetir soleiðis:

> *"There is no single accepted formulation as to how necessary or useful something must be to qualify as "essential"; however, courts are clear that the standard for essentiality is necessarily a high one as monopolist will almost always possess something its competitors or potential competitors want". (OECD, 1999)*

Fyritreytirnar fyri at nýta hugtakið grundleggjandi fasilitet um ein framleiðslufaktor eru m.a., at:

- tað er tekniskt ógjørligt, ella í øllum førum ikki skynsamt, at framleiða endavøruna uttan faktorin, og

- framleiðslufaktorurin verður stýrdur av einum einkarættarhavara ella fleiri í samstarvi,
- framleiðslufaktorurin hevur fallandi marginalkostnað og útihýsir, at kappingarneytin stovnar paralellar fasilitetir.

Um ein fyritøka eigur ella hevur avgerðarrættin til grundleggjandi fasilitetin á einum marknaði, samstundis sum hon er veitari av tænastum á sama kervi í kapping við aðrar veitarar, kann tað vera grundarlag fyri ójavnari kapping. Um hinir veitararnir hava tørv á atgeingi til hetta undirstøðukervið fyri at kunna veita eina tænastu til brúkararnar, kann veitarin við avgerðarrættinum til undirstøðukervið misnýta sína støðu í mun til kappingarneytarnar. Hinir veitararnir eru bundnir at møguleikanum fyri atgeingi til undirstøðukervið og treytunum fyri hesum. Støðan kann lýsast við ymiskum dømum, sum t.d. um ánarin av eini jarnbreyt eisini skal kappast við at bjóða uppá tokrakstur, ella um ánarin av orkuleiðandi káplunum eisini framleiðir og selur orku í kapping, ella um ánarin av einum flogvølli eisini eigur eitt flogfelag, ið kappast við onnur flogfeløg.

**Insitamentsástøði**

Innan búskaparfrøðina verður í t.d. "Principal-Agent" og "Economic Man"- ástøðunum hugt at atburðinum hjá persónum og fyritøkum við atliti til teirra "insitamentir". Stutt sagt, er niðurstøðan av hesum ástøðunum, at fólk og fyritøkur altíð bera seg soleiðis at, at teirra atburður tænir teimum sjálvum best.

Sambært insitamentsástøðinum er tað óheppið, um bygnaðurin á einum marknaði í kapping er soleiðis lagdur til rættis, at ein fyritøka varar av grundleggjandi fasiliteti, samstundis sum hon er í kapping við aðrar veitarar. Hetta tí vandi er fyri, at veitarin við tí grundleggjandi fasilitetinum um hendi fyrst og fremst hugsar um sítt egna virksemi.

Innan fjarskiftismarknaðin kunnu avleiðingarnar hugsast at verða, at prísir og treytir fyri atgeingi til tann grundleggjandi fasilitetin verða órímiligar, soleiðis at veitarin við grundleggjandi fasilitetinum stendur seg best í kappingini, og tess vegna forðar ella tarnar kappingini.

## *3.2 Natúrlig einkafeløg, stórrakstrarfyrimunir*

Hugtakið "natúrligt einkafelag" verður allýst sum ein vinna, har tað, at bert ein fyritøka framleiðir eina ávísa vøru ella tænastu, hevur við sær lægsta framleiðslukostnaðin. Við øðrum orðum eru útreiðslurnar hjá einari natúrligari einkarættarfyritøku lægri enn samlaðu útreiðslurnar hjá tveimum ella fleiri fyritøkum, sum samlað framleiða somu mongd. Orsøkin er, at miðalkostnaðurin fyri hvørja framleidda eind er fallandi, verður framleiðslan størri, tí føstu útreiðslurnar eru so miki stórar.

Um ein fyritøka tekur stig, sum avmarka kapping, kann tað metast at vera í stríð við eina skynsama nýtslu av tilfeinginum í samfelagnum. Vanliga gerst regulering óneyðug, um tað slepst undan einkarættarstøðum á einum marknaði. Tó er tað ikki altíð gjørligt ella ynskiligt at forða einkarættarstøðu. Á marknaðum við stórrakstrarfyrimunum kunnu m.a. atlit til framleiðsluskynsemi gera, at virksemið samfelagsliga og virkisbúskaparliga eigur at verða samlað í eina eind, og hava einkarættarstøðu.

At taka í nýtslu nýggja fjarskiftistøkni hevur við sær ein útreiðslubygnað, sum ger, at meðalkostnaðurin fyri hvørja eind er væl hægri, verður hon veitt í avmarkaðum tali, m.a. tá umræður menning av samskiftisskipanum, installering av grundleggjandi kervi, installering hjá

brúkarum, umframt kervisrakstur og -viðlíkahald. Stórrakstrarfyrimunir kunna m.a. vera í at gagnnýta kerviskapasitetin, av umsitingini og av tøkniligari serkønari vitan, ið kann nýtast innan ymisk økir.

Í frágreiðingini um at einskilja fyritøkur landsins (Løgmansskrivstovan, 2001) verður mett, at virksemið hjá FT kann greinast í tvey øki. Fyrra virkisøkið snýr seg um at menna og at viðlíkahalda undirstøðukervið. Kappingin er avmarkað á hesum øki. Talan er um stórrakstrarfyrimunir, sum gera, at økið fyri stóran part kann roknast sum natúrligur einkarættur. Seinna økið snýr seg um tænastuvirksemi. FT virkar her sum fyritøka, ið brúkar undirstøðukervið í sambandi við framleiðslu av tænastum, sum verða bjóðaðar fram á marknaðinum í kapping við aðrar fyritøkur, ið eisini nýta undirstøðukervið.

## 3.3 Samvirkisvirknaðir og loddrøtt samskipan

Vanliga eru fleiri lið í framleiðsluni av einari vøru, og hesi lið kunnu øll vera samskipað í einari fyritøku í loddrættari samskipan (vertikal integratión) ella tey kunnu vera partar av fleiri (minni) fyritøkum. Tá avgerðir skulu takast um, hvørji lið skulu vera samskipað í hvørjari fyritøku sær, kann ein í búskaparfrøðini hyggja at transaktiónskostnaðarbúskapi. Sambært hesum ástøði samskipa fyritøkur seg í so nógv framleiðslulið sum gjørligt, inntil kostnaðirnir verða størri enn sáttmálakostnaðirnir (contactual costs). Tá kann tað ikki longur loysa seg at samskipa fleiri framleiðslulið, og at tað tí fer at kosta meir at samskipa virksemið innanhýsis í fyritøkuni, enn tað kostar at keypa framleiðsluna uttanífrá.

Um ein fyritøka verður skild sundur í tvær ella fleiri eindir, verður tað neyðugt hjá fyritøkuni at gera sáttmálar við onnur, fyri at kunna framleiða ta vøru, ið hon er von at framleiða. Sambært transaktiónskostnaðarástøðinum merkir hetta ein meirkostnað hjá fyritøkuni, sum verður lagdur afturat prísinum, sum brúkararnir gjalda fyri tí lidnu vøruna.

Á einum fjarskiftismarknaði verða tílíkir meirkostnaðir grundaðir á eyka umsiting sum t.d. dupult bókhald, men tað er kanska serliga virknaðurin millum kervið og tænastur, ið verður mistur í eini bygnaðarligari sundurskiljing. Fjarskiftistænastur verða mentar í samstarvi millum tann tøkniliga partin av eini fjarskiftisfyritøku (kervispartin) og tann marknaðarliga partin av fjarskiftisfyritøkuni (tænastupartin). Um hesir partar eru samskipaðir í eini fyritøku, kann tað gerast lættari og bíligari at menna tænastur og kervið, enn tá partarnir eru hvør sær og skulu samstarva sum tveir sjálvstøðugir partar.

## 3.4 OECD

Í einum tilmæli hjá OECD um at sundurskilja fyrrverandi almenn veitingarvirki, sum eiga grundleggjandi fasilitetir við tí endamáli at tryggja fortreytir fyri kapping, verður mælt til, at fyrimunir og vansar við ognarligari sundurskiljing verða lýstir við atliti til kapping, gjøgnumskygni og kostnaðinum av sundurskiljingini (OECD, 2001).

Í tilmælinum verður víst á vansar við, at virksemi í kapping (tænastur) og natúrligt einkarættarvirksemi er loddrætt samskipað. Dentur verður lagdur á, at umráðandi er, at allir veitarar

hava atgeingi til undirstøðukervið, tá talan er um natúrligt einkarættarvirksemi á gjøgnumskygdum grundarlagi, uttan at munur verður gjørdur á teimum.

Í tilmælinum hjá OECD verður mett, at roknskaparligur skilnaður ella sundurskilnaður í móður/dótturfelag ikki forðar fyri grundleggjandi andsøgnunum og møguleikunum fyri at nokta ella seinka atgeingið til undirstøðukervið. Mett verður, at ein roknskaparligur skilnaður ella ein sundurskilnaður í móður/dótturfelag fær ikki sama virkna sum ognarligur sundurskilnaður.

Vist verður eisini á, at ognarlig sundurskiljing hevur við sær munandi kostnað. Felagið við grundleggjandi fasilitetinum kann hava so stórar samvirkisvirknaðir av at verða samskipað við tænastupartinum, at hesir viga upp ímóti møguligu kappingarfyrimununum, ið standast av ognarligari sundurskiljing.

Í eini seinni frágreiðing hjá OECD um ognarliga sundurskiljing av fjarskiftiskerviseigaranum (OECD, 2003), verða fyrimunir og vansar við ognarligari sundurskiljing av kervi frá tænastum viðgjørdir. OECD vísir í hesi frágreiðing á, at frælsisgeringin av fjarskifti í OECD-londunum, sum í stóran mun er farin fram frá seinnu hálvu av 1990'unum, hevur havt sum avleiðing, fallandi prísir, økta góðsku, menning av nýggjum tænastum og møguleika hjá viðskiftafólki at velja millum fleiri fjarskiftisveitarar. Samstundis staðfestir OECD, at tað hevur gingið meiri striltið við at fáa kapping innan vanligt fastnetsfjarskifti innanlands. Royndirnar hava víst, at tað er trupult hjá nýggjum veitarum at fáa atgeingi til kervið hjá fyrrverandi einkafeløgum og tí verður spurningurin um at sundurskilja kervið frá tænastum reistur. Ákærurnar móti fyrrverandi einkafeløgum hava m.a. verið, at lagdar verða kappingarforðingar so sum prísdumping, seinkanir og at prísurin fyri kervið verður trýstir upp. Atlitið til útbreiðsluna av breiðbandi hevur gjørt tað enn meiri átrokandi hjá øðrum veitarum at fáa atgeingi til kervið.

Víst verður á, at einki OECD-land hevur framt eina ognarliga sundurskiljing av kervi og tænastum.

OECD metir í hesi frágreiðing, at stórur ivi er um, eitt modell fyri sundurskiljing er, sum tikið kann verða undir við. Trupulleikarnir kunnu vera stórir av at samskipa kervið og tænastur, tá ræður um nýggjar íløgur. Eisini verður víst á, at ein ognarlig sundurskiljing fær avleiðingar fyri stórrakstrarfyrimunirnar, sum felagið hevur av, at kervið og tænastur er samansjóðað. Um so er, at kappingin økist munandi, kann tað hava við sær, at prísirnir lækka, og at góðskan á tænastunum økist. OECD metur tó, at trygd er ikki fyri, at hetta fer at henda. Ístaðin verður mett, at tann kostnaðurin, ið ein ognarlig sundurskiljing hevur við sær, sannlíkt fer at hava við sær, at prísurin á fjarskiftistænastum til viðskiftafólki økist.

Víst verður í frágreiðingini hjá OECD á, at tað er trupult at gera eina meting av fyrimunum og vansum við ognarligari sundurskiljing, av tí at tað merkir, at virðir, sum eru trupul at gera upp, skulu ásetast. Eisini er tað trupult at framskriva virðini, tá ið tøknin og marknaðirnir innan fjarskifti broyta seg skjótt.

Niðurstøðan í seinnu frágreiðingini frá OECD er, at ognarlig sundurskiljing hevur vágar við sær, og at fyrimunirnir sýnast avmarkaðir og óvissir. Ognarlig sundurskiljing kann hava við sær týðandi útreiðslur og kann hava neiliga ávirkan á kervismenningina. Mett verður sostatt, at tað ikki eru nóg góð prógv fyri, at fyrimunirnir eru størri enn vansarnir.

## 3.5 Regulering av fjarskifti

Í flestu londum heldur eitt politiskt óheft fjarskiftiseftirlit eyga við prísum og treytum fyri atgeingi til undirstøðukervið í landinum.

Eftirlit við prísum fyri atgeingi tekur vanliga støði í roknskaparupplýsingum hjá einari fyritøku. Við insitamentsástøðinum í huga kann hugsast, at fyritøkur, sum eru eigarar av undirstøðukervinum, royna at ganga uttan um reguleringina. T.d. kann ein órímuliga stórur partur av útreiðslunum verða lagdur yvir á tann partin av fyritøkuni, ið veitir atgeingi – og sum so er grundarlag undir prísunum til atgeingi. Mangul upp á klárar greiningar av býtinum av útreiðslum og ójavnari atgeingi til upplýsingar um veruliga útreiðslubygnaðin ger reguleringina trupla. Hesi viðurskifti tala fyri, at tað eigur at vera ein greiður (bókhaldsligur) skilnaður millum tann partin av fyritøkuni, ið hevur undirstøðukervið um hendi, og tann partin, ið er í kapping við aðrar veitarar.

Fyritøkur við undirstøðukervi um hendi kunnu – aftur við insitamentsástøðinum í huga – hugsast at meta kapasitetin ymsa staðni í kervinum at vera meir avmarkaðan, enn gott er, kann drála við at svara fyrispurningum, og kann velja at misnýta upplýsingar, sum hon sum kervisveitari fær í hendi frá hinum veitarunum.

Tað er umráðandi at hava í huga, at insitamentsástøðið eisini er galdandi fyri kappingarneytarnar. Hesir eru sambært insitamentsástøðinum tilreiðar at gera alt teir kunnu fyri at betra um viðurskifti teirra – bæði viðvíkjandi prís og atgeingi – og kunnu tískil hugsast at kæra øll viðurskifti teir kunnu, fyri at "gagnnýta" tann kappingarmismun, teimum er fyri. Tó soleiðis, at hinir veitararnir kunnu eisini hugsast at aftra seg at kæra, av tí at vandi er fyri, at tað kann ávirka samstarv teirra við kervisveitaran um atgeingi.

Fjarskiftisreguleringin hevur sum endamál at minka sum mest um hesar forðingar. Afturat nevndu forðingum koma so forðingar, sum standast av tí ójavna marknaðarbygnaðinum við einum ella fáum stórum og fleiri smáum fyritøkum. Neiligir avleiðingar kunna eisini standast av fjarskiftisreguleringini so sum, at útreiðsluskynsemið lækkar orsakað av samskipanartrupulleikum av kervi o.ø. Eisini kann reguleringin hava við sær neiligar signaleffektir yvirfyri møguligum íleggjarum á marknaðinum.

## 3.6 Samandráttur

Upprunaliga hava tey almennu veitingarvirkini havt einkarætt til at veita teirra tænastur, og gjørdu virkini stórar og drúgvar íløgur í undirstøðukervið, fyri at kunna veita álagdar tænastur til borgararnar í teimum einstøku londunum. Staðfestingar av, at nógv av nevnda veitingarvirkseminum var vinnuligt, heldur enn alment virksemi, umframt atfinningar við atliti til kapping, hava verið atvoldin til, at lond fóru undir at frælsisgera marknaðir.

Undirstøðukervið hjá almennu veitingarvirkjunum er at meta sum natúrligir einkarættir ella grundleggjandi fasilitetir í sambandi við eina kappingarstøðu.

Tá tað ræður um fjarskifti, er tað ikki sannlíkt, at nýggir veitarar leggja egið kervi, og tískil kann kervisparturin metast sum ein natúrligur einkarættur. Framleiðslan av einari vøru umfatar fleiri lið, og kunnu hesi lið øll vera samskipað í einari fyritøku í loddrættari samskipan ella tey kunnu vera partar av fleiri fyritøkum. Tá avgerðir skulu takast um, hvørji lið skulu verða samskipað í hvørjari fyritøku sær, kann verða hugt at transaktiónskostnaðarbúskapi. Sambært hesum ástøði samskipa

fyritøkur seg í so nógv framleiðslulið sum gjørligt, inntil samskipanarkostnaðirnir verða størri enn sáttmálakostnaðirnir.

Í einum tilmæli frá 2001 vísur OECD á, at ognarlig sundurskiljing hevur við sær munandi kostnað. Felagið við grundleggjandi fasilitetinum kann hava so stórar samvirkisvirknaðir av at verða samskipað við tænastupartinum, at hesar viga upp ímóti møguligu kappingarfyrimununum, ið standast av ognarligari sundurskiljing.

Í einari seinni frágreiðing frá 2003 staðfestir OECD, at tað hevur gingið meiri striltið við at fáa kapping innan vanliga fastnetfjarskifti innanlands. Royndirnar hava víst, at tað er trupult hjá nýggjum veitarum at fáa atgeingi til kervið hjá fyrrverandi einkafelagnum, og tí verður spurningurin um at sundurskilja kervi frá tænastum reistur. Ákærurnar móti fyrrverandi einkafelagnum hava m.a. verið, at lagdar verða kappingarforðingar so sum prísdumping, seinkanir, og at prísurin fyri kervið verður trýstir upp. Atlitið til útbreiðsluna av breiðbandi hevur gjørt tað enn meiri átrokandi hjá øðrum veitarum at fáa atgeingi til kervið. Víst verður á, at einki OECD land hevur framt eina ognarliga sundurskiljing av kervi og tænastum.

Niðurstøðan í seinnu frágreiðingini frá OECD er, at ognarlig sundurskiljing hevur vágar við sær, og at fyrimunirnir sýnast avmarkaðir og óvissir. Ognarlig sundurskiljing kann hava við sær týðandi útreiðslur og kann hava neiliga ávirkan á kervismenningina. Mett verður sostatt, at tað eru ikki nóg góð prógv fyri, at fyrimunirnir eru størri enn vansarnir.

Viðvíkjandi regulering av fjarskifti eru jaligar og neiligar avleiðingar. Neiligu avleiðingarnar kunna verða at útreiðsluskynsemi lækkar orsakað av samskipanartrupulleikum av kapasiteti o.ø. Eisini kann reguleringin hava við sær neiligar signaleffektir yvirfyri møguligum íleggjarum á marknaðinum.

# 4. Empiri

Sum leiðbeining í arbeiðinum við at lýsa fyrimunir og vansar við teimum ymisku møguleikunum fyri at umskipa bygnaðin á føroyska fjarskiftisundirstøðukervinum og bygnaðin hjá FT, hevur nevndin valt at lýsa fjarskifti í ES, umframt í Bretlandi, Danmark og USA.

## 4.1 ES

Ein full frælsisgering av fjarskiftismarknaðinum í ES varð gjøgnumførd í flestu limalondunum tann 1. januar 1998[16].

Endamálið við ES-kørmunum hevur verið at skapa kapping í veitingunum av tænastum og at tryggja eins atgeingi til kervið. Fyri at stuðla kappingini hevur ES sett í gildi ymiskar fyriskipanir, sum m.a. opna undirstøðukervið fyri øðrum veitarum, gera greiðan skilnað millum statin sum eigari at kervinum, og sum regulerandi myndugleika. At gera samskipan og sambinding møguliga og at áleggja veitingarskyldur.

Endamálið við samskipan og sambindingásetingunum eru m.a., at nýggir veitarar ikki skulu leggja nýggj kervi, men heldur gagnnýta verandi kervi. Karmar skulu vera um vinnuna, sum stimbra íløgur í at menna verandi og nýggjar fjarskiftistænastur, heldur enn at íløgurnar fara til at leggja nýggj parallell kervi.

Ábendingar vóru í Evropa um, at kappingin sjálvt í stóru londunum ikki var komin so nógv áleiðis, sum ætlað, og tók ES nýtt átak við nýggjari lóggávu við størri heimildum fyri at tryggja eina størri og varandi kapping.

Í juli 2001 legði ES-kommissiónin fram ein nýggjan fyriskipanarpakka um fjarskifti við 5 fyriskipanum (Europaparlamentets og Rådets beslutning/direktiver, 2002), sum skuldu leggja nýggjar karmar um reguleringina av fjarskifti - bæði kervið og tænastur. Endamálið við broytingunum er at stimbra kappingina innan tey ymsu virkisøkini, at verja áhugamálini hjá brúkarunum og at fylgja skjótu menningini innan samskifti; serliga samanrenningini millum fjarskifti, radio- og sjónvarpsútbreiðslu v.m. Sum útgangsstøði skal sama regulering nýtast óansæð tøknina. Fjarskiftiseftirlitini skulu gera marknaðarkanningar fyri at kanna, um tað er verulig kapping á marknaðunum, og um tað eru ein ella fleiri veitarar við einari sterkari marknaðarstøðu.

Er niðurstøðan av marknaðarkanningini, at tað ikki er verulig burðardygg kapping á einum marknaði, kunnu fjarskiftiseftirlitini seta veitarum við týðandi marknaðarstøðu kappingarregulerandi krøv.

Í nýggju atgeingisfyriskipanini (access directive) hjá ES frá 2002 verður dentur lagdur á, at ongar forðingar skulu vera fyri atgeingi hjá veitarum til kervið, og hevur kerviseigarin skyldu til at loyva atgeingi. Fjarskiftiseftirlitini í ES-limlondunum skulu hava heimild til at tryggja atgeingi og sambinding. Grundgevingin fyri nýggju fyriskipanunum og herðingin av krøvunum um atgeingi er ein staðfesting av trekleika í skipanini, tvs. at fyrrverandi einkafeløgini hava ilt við at lata øðrum veitarum atgeingi til kervið.

[16] Frælsisgeringin í Luxembourg, Írland, Portugal, Spania og Grikkalandi kom seinni.

Í Evropa hava ongar stjórnir tikið avgerð um at ognarliga sundurskilja kervið og tænastur hjá uppruna einkafelagnum. Fronsku myndugleikarnir hava víst á, at roknskaparligur skilnaður saman við kinverskum múrum kring einkarættarhavaran gevur góða trygd fyri verju móti forðingum fyri kapping (OECD, 2002; s. 29). Sonevndi kinverski múrurin merkir, at handilsligar viðkvæmar upplýsingar, sum latnar verða felagnum í sambandi við kervisatgeingi skulu viðgerast í trúnaði og ikki misnýtast. Sum dømi um lógarásettar reglur er í donsku lógini um natúrgassútbúnan, at veitingarfeløg skulu skjalfesta yvirfyri Orkueftirlitinum, at mannagongdir eru, sum tryggja, at viðkvæmar upplýsingar í sambandi við atgeingi til kervið ikki verða misnýttar.

## 4.2 Bretland

Ymiskir reguleringshættir hava verið brúktir í Bretlandi í mun veitingarvirkini við ymiskum royndum. Innan gass og el varð gjørd ein ognarlig sundurskiljing av heilsølu frá tænastufelagnum, og hevur hon skapt kapping í søluni til endabrúkaran.

Bretland var fyrsta landið í ES, sum frælsisgjørdi sín fjarskiftismarknað. Tað fyrrverandi almenna fjarskiftisfelagið British Telecom (BT) varð umskipað til partafelag og einskiljingartilgongdin fevndi um fýra umfør frá 1984 til 2000. BT er í dag 100% einskilt. BT eigur grundleggjandi fjarskiftisundirstøðukervið í landinum. Lóggávan er í tráð við ES fyriskipanirnar, og er kapping innan nógvar fjarskiftistænastur á fleiri marknaðum.

Umleið 170 veitarar eru av fastnetsfjarskifti, 59 farfjarskiftisveitarar og 700 internettænastuveitarar eru í Bretlandi.

BT hevur viðgjørt møguleikan at selja kervið úr felagnum og fekk í 2001 tvinni boð, sum felagið gjørdi av ikki at taka av. Orsøkin var, at inntøkurnar frá søluni ikki bøttu kostnaðin við at sundurskilja kervið frá tænastum hjá BT (OECD, 2003; s. 18).

Ymiskt er, hvussu stór kappingin er innan ymsu fjarskiftistænasturnar. Sambært Oftel (bretska fjarskiftiseftirlitið, 2004) hevur BT 60% av fastnetssamrøðunum og 30% av altjóða samrøðunum. BT hevur 87% av fjarskiftisveitingunum til vinnuna. Bretska fjarskiftiseftilitið staðfestir, at BT hevur týðandi marknaðarstøðu.

Í januar 2004 fór eftirlitið undir eina greining av bretska fjarskiftismarknaðinum, sum skal verða liðug við endan av 2004. Spurningarnir, sum ætlanin er at kanna, eru, um verulig kapping er á kervinum og tænastum, og hvørji útlitni eru. Eisini er ætlanin at viðgera, hvørja ávirkan tað hevur á marknaðin, at kervið og tænastur eru í einum felag í eini loddrættari samskipan.

Tosað hevur verið fyrr um at sundurskilja kervið frá tænastupartinum hjá BT, m.a. hevur ein nevnd í Undirhúsinum givið tilmæli til enska fjarskiftiseftirlitið um at sundurskilja BT. Hetta hevur hvørki bretska fjarskiftiseftirlitið ella ráðharrin í fjarskiftismálum tó møguleika fyri, tí eitt tílíkt mál verður avgjørt í nevndini í partafelagnum BT. Annars hevði talan verið um ognartøku. Bretska fjarskiftiseftirlitið metir tó ikki, at tørvur er á at sundurskilja BT, og hevur heldur ikki ætlanir ella ynskir um at sundurskilja BT (Culture Media and Sport Committee, 2002). Tó verður arbeitt við at íverkseta ein kinverskan múr umframt ymiskar innanhýsis reglugerðir fyri at sundurskilja virkisøkir í BT. Bretska stjórnin heitti í tí sambandi á jarðargasseftirlitsstovnin Ofgas um at gera eina kanning av fjarskiftismarknaðinum og um at skriva eina frágreiðing við tilmæli til møguligar broytingar.

Ofgas fanst at áskoðanini hjá bretska fjarskiftiseftirlitinum og mælti til at sundurskilja kervið frá tænastupartinum hjá BT.

## 4.3 Danmark

Liberaliseringin av fjarskifti í Danmark tók av álvara dik á seg í 1990'unum. Í 1995 varð ein fjarskiftispolitisk avtala við einum greiðum meiriluta samtykt í Fólkatinginum, ið hevði sum yvirskipað mál, at Danmark skuldi hava heimsins bestu og bíligastu fjarskiftisveitingar. Vegurin at røkka málinum var m.a. at fáa frælsa og veruliga kapping. Seinasta fjarskiftispolitiska avtalan varð gjørd í 1999. Í hesum sambandi varð málið víðka til eisini at fremja eina marknaðarmenning, ið førdi til nýskapan og vøkstur.

Í 1990 viðtók Fólkatingið lóg, ið var grundarlagið undir tí landsdekkandi fjarskiftisfyritøkuni Tele Danmark. Felagið varð stovnað sum móðurfelag fyri tær gomlu fjarskiftisfyritøkurnar og Telecom. Felagið varð lutvíst einskilt í 1994, og í 1998 varð Tele Danmark heilt einskilt frá statinum. Í 2000 broytti Tele Danmark navn til TDC. Nýggj sjálvstøðug dótturfeløg og ein nýggjur bygnaður varð skipaður m.a. við tí endamáli at økja um atliti til kundan og at skapa størri gjøgnumskygni. TDC virkar nú sum haldfyritøka (holdingfyritøka) við dótturfeløgum innan ymisk høvuðsøki.

Sambært frágreiðing um kappingarstøðuna í donsku fjarskiftisvinnuni (IT- og Telestyrelsen, 2003), er Danmark millum fremstu lond í Evropa, tá umræður frælsisgering. Í einari kanning, sum ITU (International Telecommunication Union) gjørdi í 2002, fær Danmark eisini eina leiðandi støðu í Evropa. Kanningin hjá ITU vísur á tríggjar orsøkir til hesa støðuna. Fyri tað fyrsta er Danmark frælsisgjørd tíðliga. Fyri tað næsta verður Danmark mett at vera tøkniliga nýskapandi og búskaparvøksturin er stimbrandi. Fyri tað triðja verður víst á sera virkna leiklutin hjá danska fjarskiftiseftirlitinum. Tó metir ITU ikki, at kappingarstøðan er nøktandi, serliga orsakað av trupulleikunum í Danmark við kervisatgeingi.

Danska Fjarskiftiseftirlitið gjørdi á vári 2002 eina kanning av kappingini á veitingarskylduøkinum, sum skuldi vera grundarlag undir einari meting av, hvørt farast skuldi burtur frá hámarksprísregulering. Kanningin vísti, at tað bert er á marknaðinum fyri uttanlandsfjarskifti at verulig kapping er, og mælt varð frá at fara burtur frá hámarksprísregulering.

Síðan 1999 hevur danska fjarskiftiseftirlitið javnan tikið avgerðir um at seta prísirnar hjá TDC fyri atgeingi til kervið niður. Kappingin hevur havt við sær, at TDC hevur mist marknaðarpartar serliga innan farfjarskifti, internet og fastnet, tó hevur TDC eisini seinastu árini vunnið marknaðarpartar aftur.

Danska fjarskiftiseftirlitið metir, at frælsisgeringin og kappingin alment hevur økt um nýskapanarvirksemið í fjarskiftisvinnuni. Fjarskiftiseftirlitið hevur mælt til ymisk stig til at virka fyri at taka burtur forðingar fyri kapping, hesar fevna eisini um lógarbroytingar. M.a. verður mælt til, at veitarar við sterkari marknaðarstøðu kunna áleggjast at geva veitarum í kapping eina hóskandi fráboðanartíð um nýggjar samskipanar- og sambindingartænastur[17].

[17] Hetta merkir, at danska fjarskiftiseftirlitið fær møguleika í ávísum førum at áleggja veitarum við sterkari marknaðarstøðu at støðga á, og hava eitt sonevnt "stand still-tíðarskeið". Tílík tíðarskeið kann fyrrverandi einkarfelagið, sum eigur kervið, soleiðis ikki brúka nýggja samskipanar- og sambindingartænastur til at veita nýggjar tænastur til endabrúkararnar, áðrenn kappingarneytarnir hava sama møguleika at gagnnýta tænastuna.

Nógvar forðingar snúgva seg um, at TDC ikki fer eins við øllum veitarum. Forðingar sum eitt nú atgeingi til dátabasar umframt veitingartíðir og mannagongdir í sambandi við umbønir um atgeingi. Tí mælir eftirlitið til eina útgreining av ásetingunum í løggávuni, sum forðar fyri missmuni (ikki-diskriminatiónsásetingum).

Formaðurin í danska kappingarráðnum, Svend Hylleberg, professari dr.oecon metur, at tað er skeivt, at t.d. TDC "situr á tí danska fastnetskervinum", tí felagið kann í ein ávísan mun avgera prísir og treytir fyri atgeingi til kervið, og samstundis avgera, hvar og hvussu útbreiðslan av kervinum skal vera. Svend Hylleberg heldur, at tað er sera umráðandi, at tey felags kervi, sum øll virki innan tær ymisku vinnugreinirnar tørva atgeingi til, verða løgd undir neutrala ella almenna umsjón. Í døminum um TDC er tað tó stórt sæð ómøguligt at sundurskilja felagið, nú tað er einskilt, tí tað hevði verið at lagt hald á privata ognarrættin (Skouboe, Jakob og Bent Højgaard Sørensen, 2003).

## 4.4 USA

Endamálið við fjarskiftislóggávuni í USA er at stimbra eins atgeingi til nýggjar veitarar til marknaðin. Meginparturin av partabrøvunum í fjarskiftivinnuni er á privatum hondum, tó eru nakrir lokalir fjarskiftisveitarar og nakrir kaðalveitarar, sum kommunur eiga.

Í 1996 varð nýggj fjarskiftislóg viðtikin í USA (Telecommunications Act 1996), sum legði dent á størri kapping á fjarskiftismarknaðinum, serliga hvat viðvíkur "the local loop" – ella accesskervið. Kappingin innan tráðleyst og uttanlandssamband o.l. var longu stór um tað mundi. Allir fjarskiftisveitarar skulu veita atgeingi til kervið til rímuligar prísir og treytir. Eisini regulera flestu statirnir í USA prísirnar til endabrúkarar hjá veitarum við týðandi marknaðarstøðu.

Fjarskiftispolitikkurin í USA er grundaður í nationala lóggávu og við einum nationalum fjarskiftiseftirliti. Hvør statur hevur harumframt lokal ráð, sum regulera fjarskiftisveitararnar og annað veitingarvirksemi sum el, gas, vatn og aðrar grundleggjandi fasilitetir. Kappingaravlagandi virksemi í fjarskiftisvinnuni er bæði regulerað í serstakari fjarskiftislóg og í vanligari kappingarlóg. Eitt nú verður bæði kappingar- og fjarskiftislóg brúkt til at krevja, at dominerandi veitarar veita atgeingi til kervið.

Umfatandi kjak hevur verið um ognarliga sundurskiljing av tí amerikonsku fjarskiftisvinnuni. Avgerðin um at skilja AT&T horisontalt (í geografisk økir) í tær sokallaðu "Baby Bells" í 1982 var við til at skapa tann bygnaðin, sum vinnan hevur í dag.

Feløg sum AT&T, Worldcom, Sprint o.o. hava yvirtikið nógvar privatkundar frá Baby Bells-fyritøkunum, sum eiga meginundirstøðukervini í USA. Hóast hesa – í kappingareygum positivu gongd – er framvegis mótmæli at hoyra frá ávísum bólkum innan fjarskiftismarknaðin í USA, har tosað verður um, at sundurskilja Baby Bells-fyritøkurnar í kervis- og tænastufeløg.

Í 1999 avgjørdi myndugleikin í Pennsylvania at sundurskilja heilsøluna frá søluni til endabrúkaran í fjarskiftisfyritøkuna Verizon. Í 2001 varð avgerðin tó broytt til krav um funktionella sundurskiljing av heilsøluni frá smásølu roknskaparliga og við mannagongdum, sum tryggja eins atgeingi til kervisheilsøluna hjá øllum veitarum og herd revsing, um Verizon ger missmun (OECD, 2002; s. 30).

## 4.5 Samandráttur

Ein full frælsisgering av fjarskiftismarknaðinum í ES varð gjøgnumførd í flestu limalondum tann 1. januar 1998. Tær týdningarmiklastu avgerðirnar við atliti til frælsisgeringstilgongdina vóru, at leikluturin hjá statinum sum eigari bleiv atskildur frá reguleringsmyndugleikanum, at undirstøðukervið skuldi vera frítt og ikki-diskriminerandi, og í samsvar við proportionalitetsprinsippið. Harafturat fingu veitarar samtrafikkskyldur og dominerandi operatørar fingu álagt veitingarskyldur.

Í juli 2001 legði ES-kommissiónin fram ein nýggjan fyriskipanar-pakka við 5 fyriskipanum, sum skulu leggja nýggjar karmar um reguleringina av fjarskifti – bæði fyri kervi og tænastur. Endamálið við broytingunum var at stimbra kappingina innan tey ymsu virkisøkini, at verja áhugamálini hjá brúkarunum og at fylgja skjótu menningini innan samskifti, serliga samanrenningini millum fjarskifti, radio- og sjónvarpsútbreiðslu v.m.

Bretland var fyrsta landið í ES, sum frælsisgjørdi sín fjarskiftismarknað. BT, sum í dag er 100% einskilt, eigur tað undirliggjandi fjarskiftisundirstøðukervið í landinum. Lóggávan er í tráð við ES fyriskipanirnar og er kapping á nógvum marknaðum. Oftel staðfestir, at BT framhaldandi hevur eina týðandi marknaðarstøðu. Bretska fjarskiftiseftirlitið fór í januar 2004 undir eina analysu av bretska fjarskiftismarknaðinum, sum skal verða liðug við ársenda 2004. Spurningarnir, sum Bretska fjarskiftiseftirlitið m.a. ætlar sær at kanna, eru, um verulig kapping er á kervinum og innan tænastur, og hvørji útlitini eru. Eisini er ætlanin at viðgera, hvørja ávirkan loddrætta samskipan av kervi og tænastum hevur á marknaðin.

Liberaliseringin av fjarskifti í Danmark tók av álvara dik á seg mitt í 1990'unum. Felagið varð lutvíst einskilt í 1994, og í 1998 varð Tele Danmark heilt einskilt frá statinum. TDC virkar nú sum haldfyritøka (holdingfyritøka) við dótturfeløgum innan ymisk høvuðsøki.

Danska fjarskiftiseftirlitið hevur mælt til ymisk stig til at virka fyri at taka burtur forðingar fyri kapping, hesar fevna eisini um lógarbroytingar. Formaðurin fyri danska kappingarráðið, Svend Hylleberg, professara dr.oecon, metir, at tað er skeivt at t.d. TDC "situr á tí danska fastnetskervinum", tí felagið kann í ein vissan mun avgera prísir og treytir fyri atgeingi til kervi og samstundis avgerða, hvar og hvussu útbreiðslan av kervinum skal vera.

Í 1996 varð nýggj fjarskiftislóg viðtikin í USA, sum legði dent á størri kapping á fjarskiftismarknaðinum, serliga hvat viðvíkur "the local loop" – ella accesskervið. Allir fjarskiftisveitarar skulu veita atgeingi til kervið til rímuligar prísir og treytir. Eisini regulera flestu statir í USA prísirnar til endabrúkaran hjá veitarum við týðandi marknaðarstøðu, og har eingin munandi kapping er. Endamálið við lóggávuni í USA er at stimbra eins atgeingi til nýggjar veitarar á marknaðin. Meginparturin av partabrøvunum í fjarskiftisvinnuni er á privatum hondum, tó eru nakrir lokalir fjarskiftisveitarar og nakrir kaðalveitarar, sum kommunurnar eiga.

Umfatandi kjak hevur verið um ognarliga sundurskiljing innan amerikansku fjarskiftisvinnuna, hóast ongin statur hevur framt eina tílíka ætlan í verki.

# 5. Sjónarmiðini hjá umboðunum í Kervisnevndini

Tikin eru her fram sjónarmiðini hjá FT, FSE og hinum veitarunum, ið hava verið umboð í Kervisnevndini.

Sambært arbeiðssetninginum hevur ein av uppgávunum hjá Kervisnevndini verið at lýsa fyrimunir og vansar við ávísum bygnaðarmodellum og at gera tilmæli um val av modelli ella modellum, sum farast kann víðari við.

Eftir at hava umrøtt ymiskar háttir at uppstilla bygnaðarmodel, valdi Kervisnevndin at uppstilla hesi seks modellini, ið taka støðið í tveimum dimensiónum: ***hvør partur*** møguliga átti at verði sundurskildur, umframt á ***hvønn hátt*** ein tílíkur skilnaður átti at verði framdur.

| | Heilsøludeild á kervissíðuni[18] | Sundurskiljing í móður/dótturfelog | Ognarlig sundurskiljing |
|---|---|---|---|
| Loddrøtt sundurskiljing (kervi[1] og tænastur) | Model 1 | Model 2 | Model 3 |
| Vatnrøtt sundurskiljing (t.d. mobil, internet) | Model 4 | Model 5 | Model 6 |

[1]) Kervi skal her skiljast sum tann parturin av kervinum hjá FT, ið er neyðugur hjá einum møguligum kervisfelag fyri at kunna skapa eina javna/symmetriska kapping á fjarskiftisøkinum.

Í appendiks A ber til at lesa upprunaligu viðmerkingarnar hjá pørtunum í Kervisnevndini til modellini. Arbeiðið við hesi frágreiðing og tíðin, sum fráliðin er, hevur havt eina natúrliga ávirkan á støðuna hjá pørtunum, sum kann síggjast við at sammeta viðmerkingarnar h í appendiks A við endaligu viðmerkingarnar hjá pørtunum í hesum kapittuli.

## 5.1 Føroya Tele

Í hesum brotinum verður tilmælið frá FT um framtíðar bygnaðin á fjarskiftismarknaðinum í Føroyum lýstur.

FT mælur frá ognarligari sundurskiljing av FT í kervi og tænastur og vísur í hesum sambandi til niðurstøðu í frágreiðing frá OECD (2003), at bert um tann regulativi myndugleikin kann vísa á, at fyrimunirnir eru størri enn kostnaðurin, og um aðrir regulativir hættir ikki fáast at virka, kann ein ognarlig sundurskiljing umhugsast. Grundgevingin er, at ognarlig sundurskiljing er eitt munandi inntriv í marknaðin, sum hevur við sær stórar útreiðslur. Víst verður eisini á, at vansarnir eru størri enn fyrimunirnir við eini ognarligari sundurskiljing.

FT vísur á, at talið á avtalum um sambindingar- og samskipanartænastur, sum eru gjørdar, vísir eina jaliga gongd tá ræður um atgeingi hjá øðrum veitarum til kervið. Víst verður eisini til økta marknaðarpartin hjá øðrum veitarum og til, at príslegan hevur verið støðugt lækkandi.

[18] Eftir at Kervisnevndin setti upp model 1 og 4 við eini heilsøludeild í staðin fyri Altjóða- og Samstarvsdeildina sum framtíðar model fyri skilnað av kervi og tænastum, hevur FT framt model 1 í verki.

FT vísur á, at mett verður, at ymsar ógreiður eru við, at kervið verður lagt í eitt dótturfelag hjá FT. Ógreiðurnar, FT vísur á, eru m.a. um ábyrgd og avgerðarrætt, tá ræður um at útvega nýggjan kapital, býtið av rakstrarkapitali ímillum móður- og dótturfelag, býti av yvirskoti og undirskoti í kervinum til móðurfelagið umframt hvørjar ábyrgdir og treytir liggja á øðrum veitarum í sambandi við íløgur og útnyttan av netinum. Eisini vísir FT á, at ógreiður eru viðvíkjandi sjálvum sundurbýtinum av hvørjir partar av kervinum skulu liggja hvar[19].

Ístaðin metir FT, at kervis- og tænastuparturin kann skipast við greiðum skilnaði, uttan at kervið verður lagt í eitt felag fyri seg. Við hesi skipan er tænastuparturin undir einum leiðara og kervisparturin undir øðrum leiðara. Sundurskiljingin ímillum hesar eindir er formaliserað ígjøgnum heilsøluna, ið virkar sum ein yvirordnaður stápur á kervissíðuni.

Uppgávan hjá heilsøluni er at seta í verk og fylgja upp uppá tænastuavtalur ímillum tænastupartin og kervispartin á sama hátt og undir somu treytum sum kappingarneytar hjá FT. Heilsølan skal virka eftir mannagongdum, góðkendar av FSE og undirskrivaðar av bæði stjórn og nevnd í FT. Heilsølan skal til eina og hvørja tíð kunna skjalprógva, at treytirnar eru tær somu. Heilsølan virkar undir eftirliti av einari nevnd við luttøku av stjóranum í FT, sum eisini er formaður, umframt tekniska stjóranum, fíggjarstjóranum og deildarleiðaranum fyri kervið. Sjálvstøðugur roknskapur verður fyri kervisdeildina.

FT vísur á, at ein líknandi skipan er sett í verk í Íslandi og hevur verið virkin í eina tíð við jaligum úrsliti.

## 5.2 Fjarskiftiseftirlitið

Í hesum brotinum verður tilmælið frá FSE um framtíðar bygnaðin á fjarskiftismarknaðinum í Føroyum lýstur.

FSE mælir til, at tænastuparturin (alt tað, sum ikki kemur undir kervið) verður lagt í eitt nýtt dótturfelag hjá FT, ið kann verða einskilt í stigum yvir eitt áramál. Kervisparturin verður sostatt móðurfelag hjá nýggja tænastufelagnum, og fær kervisparturin/móðurfelagið eittans endamál: at menna kervið og selja kervistænastur til allar tænastuveitarar, heruppií til egna tænastu-dótturfelagið. Av sambindingar/samskipanaravtalunum[20] (sí "Avtalur um atgeingi til kervið" í kapittul 2.2) fer kervis-móðurfelagið at veita nr. 4, 5, 7, 9 og 10. Restin av avtalunum vera hjá nýggja tænastu-dótturfelagnum. FSE mælis samstundis til, at móðurfelagið tekur sær av at einskilja tænastu-dótturfelagið.[21]

Við nýggja bygnaðinum hjá konsernini FT verður gjøgnumskygnið betra, við tað at grannskoðaður roknskapur verður gjørdur sjálvstøðugt fyri nýggja tænastu-dótturfelagið og kervis-móðurfelagið, umframt at prísir fyri kervisatgeingi í størri mun kunnu eftirmetast av eitt nú FSE. Mett verður, at ein avleiðing av hesum broytingum deils er, at tørvur verður á minni regulering sum heild, tá ræður

---

[19] FT hevur í sambandi við hoyringsviðmerkingar sínar boðað frá, at felagið metir, at farfjarskiftisskipanin eigur at vera ein partur av kervinum.

[20] Vanliga nevnt sum samflutnings- ella samtrafikkavtalur.

[21] Viðmerkjast skal, at í upprunaliga tilmælinum frá FSE varð mælt til at leggja kervispartin í eitt dóttirfelag hjá FT og ikki tænastupartin, sum omanfyri lýst. Hendan broyting av tilmælinum er komin í sambandi við endaligu viðmerkingarnar, og hevur tískil ikki fingið somu viðgerð í Kervisnevndini sum hini modellini.

um leigulinjur, rátt kopar, svart fipur og samhýsing (hús og mastrar), meðan atgeingi til annað verður framhaldandi í nýggja tænastu-dótturfelagnum og fer at krevja myndugleikaeftirlit eins og í verandi støðu.

Inntrivið er varligt í mun til at fremja eina ognarliga sundurskiljing beinanvegin, av tí at møguleiki er fyri at broyta bygnaðin, um royndir vísa, at nýggi bygnaðurin t.d. skuldi tarnað menningini av fjarskiftisvinnuni í Føroyum.

Við tilmæltu bygnaðarbroytingini av FT sær FSE onga forðing fyri, at farið verður undir at einskilja nýggja tænastu-dótturfelagið. Kervis-móðurfelagið kann verða einskilt óheft av tænastu-dótturfelagnum.

Fyri at tryggja samfelagsligu atlitini, tá tað ræður um grundleggjandi fjarskiftisundirstøðukervið, verður tó mælt til, at ræðisrætturin hjá Føroya Landstýri í kervisfelagnum verður tryggjaður.

FSE mælur til, at tað "passiva" kervið verður verandi í kervis-móðurfelagnum t.e. access-kervið, transmissiónskervið (fipur, kopar, SDH og radiolinkar), umframt mastrahús og mastrar. Tørvur er á at fáa lýst gjøllari, í hvønn mun onnur (aktiv) kervisútgerð eigur at verða verandi í felagnum saman við tí passiva kervinum í felagnum. Hetta kann m.a. verða gjørt við at lýsa ymiskar viðkomandi virkisprosessir við serligum atliti at samskiftinum millum tænastuveitarar og "nýggja" kervisfelagið.

FSE mælir til, at FT sjálvt stendur fyri at lýsa hesi viðurskifti umframt onnur tíðandi viðurskifti, so sum starvsfólkaviðurskifti, tíðarætlan o.a. í einum innanhýsis arbeiðsbólki.

Loysnin er varlig á tann hátt, at nýggja tænastu-dótturfelagið framhaldandi verður partur av kervisfelagnum í eitt nærri ásett áramál, har til ber at broyta bygnaðin, um tað vísur seg verða neyðugt. Tí er ikki neyðugt at óttast, at tann menning av fjarskiftinum í Føroyum, sum FT hevur bygt upp seinastu árini, verður tarnað. Í øðrum londum, har bygnaðarbroytingar eru gjørdar við atliti til undirstøðukervið, hava fyrrverandi einkafeløgini bygnaðarliga skipað partar av kervinum og tænastunum í deildir – ikki í dótturfeløg. Við tílíkum loysnum er ikki møguligt í sama mun at náa tað gjøgnumskygni og jøvnu kappingarfyritreytirnar, sum tann loysnin, ið her verður mælt til.

## 5.3 Hinir veitararnir

Í hesum brotinum verður tilmælið frá hinum veitarunum um framtíðar bygnaðin á fjarskiftismarknaðinum í Føroyum lýstur.

Hinir veitararnir eru samdir um, at atgeingi og gjøgnumskygni er avgerandi fortreytir fyri, at teimum skal verða lívið lagað. Teir meta, at FT hevur alstóran kappingarfyrimun av at eiga og reka kervið, samstundis sum kappast verður um tænasturnar. Hinir veitararnir kenna tað, sum um teir í stóran mun liva av náði frá Føroya Tele, tí Føroya Tele lættliga kann velja at leggja forðingar, soleiðis at ein veitari noyðist at gevast við virksemi sínum. Við hesum ójavna í atgeingi til kervið eru hinir veitararnir í iva um kapitalíleggjarar fara at hava áhuga í virkseminun hjá hinum veitarunum framyvir. Hinir veitararnir mæla tí frá, at FT verður einskilt, so leingi sum undirstøðukervið er partur av fyritøkuni.

Hinir veitararnir meta ikki, at bygnaðurin hjá FT við eini heilsølueind[22] á kervissíðuni hjá FT fer at koma eini loysn nærri, av tí at grundleggjandi trupulleikin er júst, at alt kervið og allar tænasturnar eru samansjóðaðir partar av FT.

FSE mælir til, at tænastuparturin hjá FT verður lagdur í eitt dótturfelag hjá FT við nevnd, sum er partvís óheft av FT. Hinir veitararnir meta, at hetta uppskot er eitt skilagott stig á røttu leið. Passiva kervið er týdningarmiklasti parturin av grundleggjandi fasilitetunum[23] hjá einum veitara, tí tað er óhugsandi, at aðrir fara at leggja sær egið kopar og fipurkervi.

Sjálvt um hinir veitararnir meta, at uppskotið hjá FSE er eitt stig á røttu leið, so er hetta tó ikki nøktandi. Uppskotið hjá FSE førir t.d. við sær, at ein PSTN (fastnet) veitari verður noyddur at byggja eitt heilt kervi (við RSS[24] og AXE[25]) fyri at gerast óheftur av FT. Tað vil siga, at lutfallsliga stórar íløgur skulu til, fyri at hinir veitararnir skulu sleppa undan at avrokna í kervinum hjá FT.

Hinir veitararnir skjóta tí upp, at passiva kervið og ein partur av aktiva kervinum verða ognarliga sundurskild og løgd í eitt felag fyri seg – óheft av FT. Talan er um hesar partar:

- Passiva kervið, sum lýst í uppskotinum hjá FSE
- Aktivt kervi: AXE og RSS til rákoblaða kervið
- Aktivt kervi: ATM-switch og routaraútgerð til pakkakoblaða kervið[26]

Hinir veitarnir meta, at ein tílík ognarlig sundurskiljing er besta loysnin. Loysnin gevur neyðugt atgeingi og gjøgnumskygni, sum kann tryggja veruliga kapping á fjarskiftisøkinum.

Hinir veitararnir meta eisini, at ein einskiljing av FT í núverandi líki hevði sett hinar veitararnar í eina sera óhepna støðu, tí at ein privatur eigari av FT ikki kann taka somu atlit, sum verandi almenni eigari kann.

## 5.4 Samandráttur

Partarnir í Kervisnevndini eru ikki á einum máli um, hvat hevði verið rættast at gjørt við kervið hjá FT, sum er undirstøðukervið hjá føroysku fjarskiftisvinnuni.

FT mælur frá ognarligari sundurskiljing av FT í kervi og tænastur, og vísur í hesum sambandi til niðurstøðu í frágreiðing frá OECD (2003) um, at bert um regulativi myndugleikin kann vísa á, at fyrimunirnir eru størri enn kostnaðurin, og at aðrir regulativir hættir ikki fáast at virka, kann ein ognarlig sundurskiljing umhugsast.

Ístaðin metir FT, at kervis- og tænastuparturin kann skipast við greiðum skilnaði, uttan at kervið verður lagt í eitt felag fyri seg. Við hesi skipan er tænastuparturin undir einum leiðara og kervisparturin undir øðrum leiðara. Sundurskiljingin í millum hesar eindir er formaliserað ígjøgnum heilsøluna, ið virkar sum ein yvirordnaður stápur á kervissíðuni. Uppgávan hjá heilsøluni er at seta í

---

[22] Sum nevnt fyrr, hevur FT longu stovnað eina tílíka heilsølueind.
[23] Sí brot um grundleggjandi fasilitet í hesi frágreiðing.
[24] RSS (Remote Subscriber Switch) eru umskiftisstøðir, ið kunnu umskifta samrøður á lokalstaðnum, tó fer signalering fram yvirfyri AXE-sentralunum.
[25] AXE (Automatic Exchange Electric) er merkið á teimum báðum meginsentralunum/switch'unum, ið umskifta føroysku fastnetsferðsluna; ein er í Runavík (nevnd RUNA) og ein í Tórshavn (nevnd THOR).
[26] ATM (Asyncronus Transfer Mode).

verk og fylgja upp uppá tænastuavtalur ímillum tænastupartin og kervispartin á sama hátt og undir somu treytum sum kappingarneytar hjá FT.

FSE mælir til, at tænastuparturin verður lagdur í eitt nýtt dótturfelag hjá FT. Kervis-móðurfelagið skal við hesi bygnaðarbroyting hava eittans endamál: at menna kervið og selja kervistænastur. FSE metir inntrivið vera varligt í mun til beinanvegin at fremja eina ognarliga sundurskiljing, av tí at møguleiki er fyri at broyta bygnaðin innan eitt nærri ásett áramál, um royndir vísa, at nýggi bygnaðurin eitt nú skuldi tarnað menningini innan fjarskiftisvinnu í Føroyum. Við tilmæltu bygnaðarbroytingini av FT sær FSE onga forðing fyri, at farið verður undir at einskilja nýggja tænastu-dótturfelagið. Kervis-móðurfelagið kann verða einskilt óheft av tænastu-dótturfelagnum. Fyri at tryggja samfelagsligu atlitini, tá tað ræður um grundleggjandi fjarskiftisundirstøðukervið, mælir FSE tó mælt til, at ræðisrætturin hjá Føroya Landstýri í kervisfelagnum verður tryggjaður.

Hinir veitararnir eru samdir um, at atgeingi og gjøgnumskygni er avgerandi fyritreytir fyri, at teimum skal verða lívið lagað. Teir meta, at FT hevur alstóran kappingarfyrimun av at eiga og reka kervið, samstundis sum kappast verður um tænasturnar. Hinir veitararnir meta ikki, at ein nýggj heilsølueind á kervissíðuni hjá FT fer at koma eini loysn av grundleggjandi trupulleikanum nærri. Heldur ikki meta hinir veitararnir, at tilmæli hjá FSE um at leggja tænastupartin hjá FT í eitt dótturfelag hjá FT er nøktandi, hóast teir meta tað vera eitt skilagott stig á røttu leið.

Hinir veitarnir mæla til eina ognarliga sundurskiljing av kervinum frá tænastum. Í mun til tilmælið hjá FSE mæla hinir veitararnir til, at ein størri partur av kervinum verður knýttur at kervisfelagnum. Hinir veitararnir meta eisini, at ein einskiljing av FT í núverandi líki hevði sett hinar veitararnar í eina sera óhepna støðu, tí at ein privatur eigari av FT ikki kann taka somu atlit, sum verandi almenni eigari kann.

Á myndini niðanfyri sæst, hvussu fjarskiftismarknaðurin sá út, áðrenn kapping kom í Føroyum, sammett við tilmælini hjá ávikavist FT, FSE og hinum veitarunum.



# 6. Greining

Frágreiðingin hevur sum endamál at viðgera, um verandi bygnaður á fjarskiftismarknaðinum, við FT sum høvuðskervisveitara og tænastuveitara í einum felagi, er besti karmur um fjarskiftismarknaðin í Føroyum.

Fyrilitini í kanningini hava m.a. verið:

- at eggja nýggjum veitarum at koma inn á føroyska fjarskiftismarknaðin og at verða verandi
- at skapa stabilar karmar
- at regulera minst møguligt
- at javnstilla fyrrverandi einkafelagið
- at skapa gjøgnumskygni
- at optimera kervið
- tænastu- og prísstøðið hjá brúkarunum
- framhaldandi menning av undirstøðukervinum

Hendan frágreiðing viðger, hvørjir karmar eru teir bestu til at tryggja kapping og omanfyrinevndu atlit. Fjarskiftispolitikkurin byggir á, at lóg og eftirlit eru, sum skulu tryggja ímóti teirri grundleggjandi andsøgn, at ein fyritøka eigur eitt undirstøðukervi, sum kappingarneytarnir hjá somu fyritøku skulu hava atgeingi til. Spurningurin, ið verður viðgjørdur, er, um aðrir møguleikar eru, sum taka burtur andsøgnina ella minka um hana.

Støðið fyri frágreiðingina er ymsu áhugamálini hjá pørtunum í Kervisnevndini, og tann veruleiki, at einki OECD-land, hevur framt eina ognarliga sundurskiljing av kervi frá tænastum. Hetta hevur við sær, at nevndin bert kann meta um fyrimunir og vansar og kann ikki byggja metingarnar sínar á eygleiðingar av royndum aðrastaðni frá.

Møgulig modell, sum nevndin hevur viðgjørt er núverandi bygnaður, ognarlig sundurskiljing og móður/dótturfelagsmodellið.

## Núverandi bygnaður

Núverandi bygnaður, lóggáva og fjarskiftispolitikkur er í tráð við ES-fyriskipanir og bygnað í ES-limalondunum. Vísandi til brot í hesi frágreiðing um avtalur um atgeingi til kervi eru nú samskipanar- og sambindingaravtalur komnar í eina fasta legu og fordømi eru um flestu viðurskifti. Tá ræður um kapping, er einkarætturin nú brotin á at kalla øllum fjarskiftistænastuøkjunum, og hevur hetta viðført tænastumenning og lægri prísir. Føroyski fjarskiftismarknaðurin er í løtuni ikki í einari vanligari kappingarstøðu. Hóast kapping er komin á flestu økjum, so hevur FT í løtuni eina sterka marknaðarstøðu á flestum tænastum.

Núverandi bygnaður er eisini, at Føroya Tele er eitt alment partafelag og hóast ávirkanin er avmarkað til at taka avgerðir á aðalfundinum, so er hugsandi, at felagið tekur almenn atlit, tá ræður um atgeingi til kervið. Spurningurin er, um ein einskiljing fer at hava neiliga ávirkan á atgeingi til kervið, av tí at áhugamálini hjá eigarunum tá ikki eru almenn men bert handilslig.

FT hevur ment seg nógv seinastu árini, bæði fíggjarliga, tá ræður um menning av starvfólkunum, nýggjar tænastur og arbeiðið við nýggjum virkisøkjum.

Samanumtikið er kapping komin á nærum øllum tænastuøkjunum, samskipanar- og sambingingaravtalur verða bjóðaðar fram og eru komnar í eina meiri fasta legu, FT er væl fyri fíggjarliga, og hevur staðið fyri munandi íløgum í menning av kervinum innanlands og í uttanlandssambandinum. Hesi viðurskifti bera boð um, at bygnaðurin ikki hevur forða fyri hesum. Vansin er tó, at kappingin ikki enn kann sigast at vera burðurdygg, og at nøgdsemi er ikki millum hinar veitararnar, tá ræður um atgeingi til kervið.

Fyrimunurin við verandi bygnaði, at kervi og tænastur eru í sama felag, er eisini, at hesin bygnaður verður nýttur eitt nú í ES-limalondunum, og í øllum OECD-londunum. Eingi fordømi eru um, at kervið er sundurskilt frá tænastum, og er tað ein vansi, tí tá kennur ein ikki avleiðingarnar til fulnar, metast kann bert um hesar.

Møguleiki er fyri at seta í verk ávís onnur tiltøk, sum í størri mun kunnu skapa gjøgnumskygni og fortreytir fyri atgeingi. Harumframt at verandi lóggáva verður endurskoðað, bæði viðvíkjandi konsessiónum, virkisroknskapi, príseftirliti v.m.

## Ognarlig sundurskiljing

Í viðgerini av einari ognarligari sundurskiljing av kervi frá tænastum verður mett, at fyrimunirnir eru, at insitamentið verður broytt frá at gera mun á atgeingi til kervið, gjøgnumskygni verður økt og forða verður fyri krosstuðuli. Insitamentið hjá leiðsluni í einum sundurskildum kervisfelagi er at taka atlit til heilsøluna av kervinum og sleppur frá at taka atlit til sølu og marknaðføring av tænastum til endabrúkaran. Hetta verður mett at fara at tryggja menning av kervistænastum, kervisrakstrartrygdina, og at atgeingið til kervið verður eins. Skipanin við einum sundurskildum kervisfelagi er ein lutfalsliga einføld skipan og viðførur meiri einfalda regulering enn núverandi skipan. Eftirlitið hevði lagt dent á kervisheilsøluna ístaðin fyri prísregulering í mun til endabrúkaran. Samanumtikið kann væntast, at tørvurin á og kostnaðurin av regulering hevði minkað. Ein ognarlig sundurskiljing vil hava við sær, at hvørt felag sær fer at hava insitament til at optimera sítt virksemi. Kervisfelagið strembar ímóti at selja sum mest av kervinum, eisini til kappingarneytar. Um tænastuveitingin er í sama felag sum heilsølan av kervinum, ganga handilsligu málini ímóti hvørjum øðrum. Økt søla av kervinum hevur økta kapping við sær á tænastuøkinum.

Vansarnir við at ognarliga sundurskilja kervið frá tænastum eru beinleiðis kostnaðirnir av at íverkseta sundurskiljingina og av tapi av sjálvari sundurskiljingini. Hugsa verður her um m.a. øktar umsitingarkostnaðir, tap av vitan og samvirkisvirknað millum kervið og tænastur. Stórrakstrarfyrimunir fara fyri skjeytið og spurningurin er, hvussu ein tryggjar insitament til at menna kervið. Verður kervið hjá FT sundurskilt frá tænastum og tænastufelagið einskilt, ber illa til at venda aftur, soleiðis at kervi aftur verður ein partur av FT. Hendan trupulleika kann møguliga sleppast undan um kervið og tænastur verða løgd í hvør sítt alment partafelag, og at hvørki felag verður einskilt.

Verður einki samband millum kervið og endabrúkara, verður mett, at tað kann geva trupulleikar við samskipan. Kervisfelagið tekur avgerð um íløgur í menning av kervinum og ber vágan av, at tænastuveitararnir eru sinnaðir at gera íløgur í marknaðarføring av nýggjum fjarskiftistænastum.

Ein annar vansi kann vera, at partaeigarin í kervisfelagnum er tað almenna, ið ikki setur somu krøv um avkast sum privatir partaeigarar. Kervisfelagið fer at hava einkarættarstøðu, tó soleiðis, at um heimild verður fyri, at onnur feløg leggja egin kervi, er møguleiki fyri kapping millum kervini, eitt

nú um m.a. elkervi verða ment til at veita fjarskiftistænastur og onnur feløg leggja tráðleys kervi. Hesi viðurskifti kunna ávirka insitamentið hjá felagnum til at fáa sum mest burturúr virkseminum og til at veita keyparanum av kervistænastum eina góða tænastu til ein góðan prís. Kervisfelagið fer at verða einkarættarprísregulerað og minkar tað um insitamentið til at framleiða kervið bíligа, tí tað hevur ikki við sær meiri inntøku bert lægri prís. Av tí at felagið hevur einkarættarstøðu manglar felagið insitament til at veita góða tænastu til áhugaverdan prís fyri at selja sum mest og fáa sum mest burturúr. Talan er um virksemi innan eitt øki eyðmerkt við menning og nýskapan, og ivasamt er um, eitt alment einkafelag hevur insitament til vága og nýskapan. Harumframt fer FT í øllum førum í fyrstu atløgu at hava eina einkarættarstøðu sum keypari av kervi frá kervisfelagnum. FT hevur í dag umleið 80% av marknaðinum.

## Markið millum kervið og tænastur

Verður gjørt av at ognarliga sundurskilja kervið frá tænastum, er neyðugt at gera av, hvør partur av kervinum skal skiljast frá. Neyðugt er at gera av, hvar markið skal vera millum kervisheilsøluna og virðisøkjandi tænasturnar. Summar tænastur eru samansjóðaðar við kervið og kunna tí leggjast undir bæði kervið og tænastur. Samanrenning av tøkni og broytt nýtsla av kervinum fer at ávirka reguleringina og skal havast í huganum, um gjørt verður av at fremja tílíkar bygnaðarbroytingar.

Tveir meginhættir eru viðvíkjandi skipan av kervinum:

- Kervisfelagið eigur bert grundleggjandi (passiva) kervið
- Kervisfelagið eigur grundleggjandi kervið og partar av aktiva kervinum

Hvør møguleiki verður valdur, er tengt at, um endamálið við sundurskiljingini er at skilja tað kervið frá, sum er ikki-kappingarført, tvs. har tað ikki er møguligt hjá øðrum veitarum at leggja alternativ kervi. Fyrimunurin við hesum møguleikanum er, at ognirnar, sum verða skildar frá, eru avmarkaðar mest møguliga. Vansin er, at eingin ávís eind hevur ábyrgdina av at reka og at viðlíkahalda viðkomandi partin av aktiva kervinum, og at hetta kann hava við sær truplar samráðingar millum partarnar. Um endamálið er, at trupulleikin við at atgeingi virkar sum ein fløskuhálsur fyri aðrar veitarar skal takast burtur, so røkkur ein endamálinum betur, um kervisfelagið umframt koparkervið eisini eigur partar av tí aktiva kervinum. Tað verður samstundis einfaldari at reka og viðlíkahalda. Tó fer hesin møguleikin at hava við sær tørv á at gera av, hvussu avrokning, virðisøkjandi samrøðumøguleikar og aðrar tænastur (intelligens í kervinum) skulu veitast.

## Ognarviðurskifti á kervinum

Tá ræður um ognarviðurskifti á einum kervisfelagi eru ymiskir møguleikar. Ein møguleiki er, at kervisfelagið verður einskilt, og nýggir veitarar kunna eiga egið kervi, so leingi teir ikki hava dominerandi marknaðarstøðu. Hin møguleikin er, at kervisfelagið er eitt alment partafelag við einkarætti til grundleggjandi kervið. Triði møguleikin er, at fjarskiftisveitararnir í einum konsortium eiga kervisfelagið (felagsskapur av tænastuveitarum "Carriers-carrier"). Nýíløgur fara fram eftir tørvi, og tá semja er um hetta. Á hendan hátt verður samband millum kervisvirksemið og viðskiftafólkið varðveitt. Við at veitararnir hava umboð í nevndini fyri felagnum, verður mett at dagføring og menning av kervinum verður tryggjað. Hinvegin er tað hugsandi, at eigararnir hava ymisk áhugamál, tá ræður um íløgur í kervið, av tí at veitararnar leggja seg eftir at veita ymsar tænastur.

Vandi er fyri, at forðingar verða lagdar fyri nýggjar veitarar. Tí verður neyðugt við ávísari regulering fyri at tryggja møguleikanum hjá nýggjum veitarum at gerast eigarar í kervisfelagnum.

Gerast má greitt, um tað bert er kervisfelagið, sum skal kunna verða kervisheilsøla, og um felagið verður avmarkað til bert at veita kervisatgeingi. Er talan um einkarættarfelag, verður neyðugt at prísregulera kervið.

## Dótturfelagsmodellið

Triðji møguleikin, sum nevndin hevur viðgjørt, er at leggja kervis- ella tænastupartin hjá FT í eitt partafelag, sum ikki verður ognarliga sundurskilt, men stovnað sum eitt dótturfelag, har allur partapeningurin verður ogn hjá móðurfelagnum – FT. Fyrimunurin við hesum møguleikanum er, at meðan hesin bygnaðurin eisini skapar betri gjøgnumskygnið við tað, at grannskoðaður roknskapur verður gjørdur sjálvstøðugt fyri nýggja dótturfelagið, so er inntrivið varligt í mun til eina ognarliga sundurskiljing, av tí at møguleiki er fyri at broyta bygnaðin, um royndir vísa, at nýggi bygnaðurin t.d. skuldi tarnað menningini av fjarskiftisvinnuni í Føroyum. Hinvegin kann skipan av dótturfelagnum eisini síggjast sum verandi eitt stig á leiðini til ognarliga sundurskiljan av kervi frá tænastum, vísa royndir, at fyrimunir eru av hesum.

Reglur og mannagongdir kunna tá gerast fyri trúnaðarviðgerð av viðbreknum upplýsingum hjá nýggja dótturfelagnum í sambandi við samskifti við tænastuveitarar um atgeingi til kervið – óansæð um tænastuveitarin er FT sjálvt ella ein annar tænastuveitari.

Umhugsast kann at stovna eitt veitararáð, har allir fjarskiftisveitarar kunnu verða umboðaðir. Veitararáðið verður eitt ráð, har t.d. nýggj tøkni verður viðgjørd. Nýggja dótturfelagið kann sostatt fáa ráðgeving um, hvørja tøkni mælt verður til at gera íløgur í, og verða allir veitarar við í hesi tilgongd.

Vansarnir við hesum bygnaði eru kostnaðurin av at skipa eitt dótturfelag, og at kervisfelagið framhaldandi er ein partur av FT, sum eisini er tænastuveitari til endabrúkarar, og tí kann væntast, at feløgini fara at taka eitt samlað atlit til marknaðarstøðuna. Tilber eisini roknskaparliga at flyta ímillum móður- og dótturfelag soleiðis at gjøgnumskygni minkar. Við støði í tí samlaða atlitinum hjá FT er eisini ein vansi, at tað er hugsandi, at felagið kann hava ein áhuga í at kunna taka ein hægri prís fyri atgeingi til kervið við at flyta útreiðslur yvir í kervispartin.

Um endamálið við at sundurskilja FT við einum móður/dótturfelagsbygnaði í kervi og tænastur er at tryggja avgerðarrætt á kervið og at hava møguleika fyri at gera eina ognarliga sundurskiljing seinni, er tað neyðugt, at hesi viðurskifti eru løgd til rættis áðrenn fari verður undir at einskilja.

Verður tænastuparturin (alt tað, sum ikki kemur undir kervið) lagt í eitt nýtt dótturfelag hjá FT, kann hetta felagið verða einskilt í stigum yvir eitt áramál, uttan at ræðisrætturin hjá landinum yvir kervið verður ávirkaður.

## Perspektivering

Umstøðurnar broytast við nýggjari tøkni, samanrenning ímillum ymsar tøknir, og kappingin millum ymsar tøknir. Kappingin millum ymsu tøknirnar ávirkar eisini týdningin av grundleggjandi kervinum. Nýggj tøkni skapar møguleikar fyri øktari kapping millum kervi. Tráðleyst internet kappast við internet yvir kopar og fipur (ADSL). Økt bandbreidd á farfjarskiftiskervinum gevur møguleika fyri dátaflutning yvir fartelefon. Fastnettelefoni á internetinum broytir eisini fortreytirnar. Nýggir møguleikar verða eisini skaptir við fjarskifti á elkervinum og dátaflutningi tvívegis yvir talgilt útvarps- og sjónvarpssendinet. Neyðugt er at taka hædd fyri, at fjarskifti ikki er

statiskt, av tí at tøknin áhaldandi skapar nýggjar møguleikar og umstøður, eisini tá tað ræður um kervið.

Í sambandi við kervisviðgerðina er eisini neyðugt at taka støðu til veitingarskylduna, tvs. at tryggja grundleggjandi fjarskiftistænastur eisini til ikki-handilslig økir.

Tá samanum kemur, verður kervið – óansæð bygnað – eyðkent við einkarættarstøðu, so spurningurin er, um einkavirksemið skal verða partur av einari fjarskiftisfyritøku, ið samstundis veitur tænastur til endabrúkaran, ella um einkafelagið skal verða ein óheft heilsøla.

# 7. Keldur

Budde, Paul (2003): "Global Regulatory – Structual Separation", *Paul Budde Communication Pty Ltd*, Australia.

Crandall, Robert W. og J. Gregory Sidak (2002): "Is Structural Separation of Incumbent Local Exchange Carriers Necessary for Competition?", *Yale Journal on Regulation.*

Culture Media and Sport Committee (2002), "Report from Culture Media and Sport Committee report on communications".

Europaparlamentet og Rådets beslutning (2002): "Europaparlamentets og Rådets beslutning nr. 676/2002/EF af 7. marts 2002 om et frekvenspolitisk regelsæt i Det Europæiske Fællesskab (frekvenspolitikbeslutningen)".

Europaparlamentets og Rådets direktiver (2002):

- "Europaparlamentets og Rådets direktiv 2002/19/EF af 7. marts 2002 om adgang til og samtrafik mellem elektroniske kommunikationsnet og tilhørende faciliteter (adgangsdirektivet)."
- "Europaparlamentets og Rådets direktiv 2002/20/EF af 7. marts 2002 om tilladelser til elektroniske kommunikationsnet og -tjenester (tilladelsesdirektivet)."
- "Europaparlamentets og Rådets direktiv 2002/21/EF af 7. marts 2002 om fælles rammebestemmelser for elektroniske kommunikationsnet og -tjenester (rammedirektivet)."
- "Europaparlamentets og Rådets direktiv nr. 676/2002/22/EF af 7. marts 2002 om forsyningspligt og brugerrettigheder i forbindelse med elektroniske kommunikationsnet og - tjenester (forsyningspligtdirektivet)."

Fjarskiftiseftirlitið (2004): "Ársfrágreiðing 2003".

Føroya Tele (2002): "Regulatory Issues – Analysing the Basis for a Common Position for Members of the Telecom Operators in Small States".

Hyman, Leonard S. (1995): "The Privatization of Public Utilities", *Public Utilities Reports, Inc.*

IT- og Telestyrelsen (2003): "Telekonkurrenceredegørelse 2003", Redegørelse om konkurrencesituationen i den danske telesektor, *Ministeriet for Videnskab, Teknologi og Udvikling.*

Konkurransetilsynet (2002): "Regulering av essensielle fasiliteter for konkurranse", *Norwegian Competition Authority.*

KonkurrenceStyrelsen (1998): "Fremtidens konkurrenceregime".

Løgmansskrivstovan (2001): "Frágreiðing um at einskilja fyritøkur landsins".

Harland, Christopher og Rick Ball (2003): "Structural Separation & Reduction of Commonwealth Interest in Telstra's Non-Network Business", *Morgan Stanley*, Australia.

OECD (1999): "Journal of Competition Law and Policy", Vol. 1, No. 4.

OECD (2001): "Draft Council Recommendation Concerning Structural Separation in Regulated Industries", *Note by the Secretary-General.*

OECD (2002): "Structural Separation of Incumbent Telecommunications Carriers (Including Proposals for Divestiture of the Local Loop)", *Working Party on Telecommunication and Information Services Policies, Directorate for Science, Technology and Industry, Committee for Information, Computer and Communications Policy.*

OECD (2003): "The Benefits and Costs of Structural Separation of the Local Loop", *Working Party on Telecommunication and Information Services Policies, Directorate for Science, Technology and Industry, Committee for Information, Computer and Communications Policy.*

Oftel (2002): "Oftel publishes response to the Culture Media and Sport Committee report on communications", press release, *Office of Telecommunications*, Stórabretland.

Sandberg, Raquel Noriega (2002): "Structural Separation in The Telecommunications Sector: Remedy og Burden?", *Fundación de Estudios de Regulación, Madrid, Spania.*

Skouboe, Jakob og Bent Højgaard Sørensen (2003): "Vagthund går til angreb på monopoler", *Berlingske Tidende*, 7. mai 2003.

White, Lawrence J. (2000): "US telephone dereglulation: lessons to be learned, mistakes to be avoided", *Japan and the World Economy.*

Williams, Curtis J. (2001): "Structural Separation in Other States, Commission Workshop on AT&T, TCG, and MediaOne's Petition for Structural Separation of BellSouth", *Division of Policy Analysis & Intergovernmental Liason, Florida Public Service Commission.*

Wynns, Peyton L. (2004): "The Limits of Economic Regulation: The U.S. Experience", *Federal Communications Commission, U.S.A.*

# Appendiks

## *Appendiks A: Modellapparat*

Sambært arbeiðssetninginum hjá nevndini hevur ein av uppgávunum verið at lýsa fyrimunir og vansar við ávísum bygnaðarmodellum fyri FT, fyri tess at gera tilmæli um val av modelli ella modellum, sum farast kann víðari við.

Eftir at hava umrøtt ymiskar háttir at uppstilla bygnaðarmodell við, valdi nevndin at uppstilla hesi seks modellini, ið taka støðið í tveimum dimensiónum: *hvør partur* møguliga átti at verði sundurskildur, umframt á *hvønn hátt* ein tílíkur skilnaður átti at verði framdur:

| | Heilsøludeild á kervissíðuni | Sundurskiljing í móður/dótturfeløg | Ognarlig sundurskiljing |
|---|---|---|---|
| Loddrøtt sundurskiljing (kervi[1] og tænastur) | Model 1 | Model 2 | Model 3 |
| Vatnrøtt sundurskiljing (t.d. mobil, internet) | Model 4 | Model 5 | Model 6 |

[1]) Kervi skal her skiljast sum tann parturin av kervinum hjá FT, ið er neyðugur hjá einum møguligum kervisfelag fyri at kunna skapa eina javna/symmetriska kapping á fjarskiftisøkinum.

### Model 1

Ein heilsøludeild verður sett á stovn, ið yvirtekur tær uppgávur, sum Altjóða- og Samstarvsdeildin hjá FT hevur í dag, tó undantikið teir regulatorisku spurningarnar, ið verða latnir tí løgfrøðiliga stápinum hjá FT.

**Meting av modellinum**

| Atlit 1: Kappingarstøða, herundir mobilitetur og gjøgnumskygni | |
|---|---|
| **Fyri** | **Ímóti** |
| **FT:**<br>FT metir, at tað er samfelagsbúskaparliga optimalt, og at tað tryggjar mobilitetin hjá brúkarunum á besta hátt, um grundleggjandi undirstøðukervið er undirlagt ONP[27], sum kann tryggja stórt gjøgnumskygni í atgeingi og prísstrukturi.<br><br>Tískil metir FT, at atlitið er best tryggjað við núverandi støðu, har FT við eins sømdum bjóðar út atgeingi til fleiri veitarar (umframt seg sjálvan) á einum nýmótans kervi og til ikki-diskriminerandi og lágar prísir. | **Hinir veitararnir:**<br>Hinir veitararnir meta, at verandi støða gevur eina sera ójavna kapping, har FT útnyttar synergi-effektina millum tænastu- og kervispartin til at a) minka um mobilitetin og b) grugga gjøgnumskygni. At talan er um eina heilsøludeild við øðrum organisatoriskum heimildum enn verandi altjóða- og samstarvsdeild kann virka jaligt, men heilsøludeildin er framvegis partur av FT, sum framhaldandi hevur møguleikan at brúka sterku strategisku støðuna at kúga hinar veitararnar. |

[27] ONP (Open Network Provision) – á føroyskum sambindingar- og samskipanarreglur í konsessiónini.

| | |
|---|---|
| FT metir, at føroyski fjarskiftismarknaðurin hevur ment seg sera skjótt tey seinastu árini, og at FT livir upp til krøv og endamálsorðingar í fjarskiftislógini, konsessiónini og øðrum galdandi fyriskipanum t.d. ONP. FT virkar longu innanfyri model 1 og 4, og metir felagið, at hetta er besta trygdin, sum kappingarneytar, kundar og marknaðurin sum heild kunnu fáa. | **FSE:**<br>FSE metir ikki, at tað broytir so nógv at gera heilsøludeild í mun til verandi støðu, burtursæð fyri starvsfólkini, ið fáa eina meiri greiða og eintýðuga uppgávu. Deildin verður framvegis ein samanrunnin partur av fyritøkuni, ið vil taka egin atlit framum, og uppfatar kerviskundar fyrst og fremst sum kappingarneytar og minni sum kundar. Skipanin hevur tann vansan, at aðrir veitarar skulu tingast við FT um atgeingi til kervið hjá FT.<br><br>Vandi fyri assymetri í viðgerini av øðrum veitarum og egnum virkisøkjum.<br><br>Dømi – P/F Televarpið fekk samhýsning á Støðlafjalli uttanum A&S-deildina, ið samstundis boðaði Kalli frá, at einki pláss var, hóast Kall hevði biðið um samhýsing áðrenn. Tó hevur A&S-deildin loyst málið á nøktandi hátt eftirfylgjandi. |
| **Atlit 2: Regulering, herundir stabilar karmar** | |
| **Fyri** | **Ímóti** |
| | **Hinir veitararnir:**<br>Eitt støðugt stríð millum FT og hinar veitararnar, har hinir veitararnir støðugt venda sær til eftirlitsmyndugleikan at kæra ójøvnu kappingina.<br><br>**FSE:**<br>FT fer í fleiri ár framyvir at hava eina sera dominerandi marknaðarstøðu og stóra fíggjarorku. Tørvur verður framhaldandi á lutvísari almennari reglulering av endabrúkaraprísum og tryggjan av atgeingi til kervið og tænastur hjá FT til ein rímuligan prís. Flestu samtrafikk-mál eru loyst á føroyska marknaðinum, við at FSE er komið uppí málini við semingsuppskotum ella avgerðum. Hetta ger, at málini draga út, og tíðin er sera avgerðandi fyri íløguhugin hjá nýggjum veitarum. |

| Atlit 3: Kervið, herundir optimal nýtsla og tøknulig menning | |
|---|---|
| **Fyri** | **Ímóti** |
| **FT:**<br>Verandi integratión millum FT-tænastur og FT sum kervisveitara sæð frá einum kundaperspektivi og frá einum samfelagsbúskaparligum sjónarmiði - er tað optimala. Tað fer tað eisini verða, sæð frá sjónarmiðunum hjá kappingarneytunum, um so er, at trygd verður veitt fyri, at ótálmað atgeingi til somu prísir fyri allar veitarar er galdandi.<br><br>Hóskandi tillaging av innanhýsis bygnaðinum á FT í hesum sambandinum er, at núverandi Altjóða & Samstarvsdeildin verður avtikin, og at ein Heilsøludeild (Carrier Service) verður stovnað á kervissíðuni, fyri á hendan hátt at klárleggja grundsjónarmiðið, sum er "Wholesale - is better than no-sale". Wholesale fer at hava klárari karmar at virka undir, skjótari leveransur og meira(betri) gjøgnumskoðiligari prísir. | **Hinir veitararnir:**<br>Nógvar óneyðugar dupultíløgur, tí hinir veitararnir vilja gera nógv fyri ikki at vera heftir av FT. Tøkniliga menningin er merkt av, at a) FT roynir at fasthalda strategisku støðuna, og b) hinir veitararnir nýta nýskapanarorkuna til at sleppa undan høpisleysu støðuni. Kervið verður ikki optimalt nýtt, og tøkniliga menningin avskeplast.<br><br>**FSE:**<br>Kervið verður ikki optimalt brúkt, av tí at AS-deildin (wholesale & regulatorisk viðurskifti) og leiðslan optimera støðuna hjá felagnum sum heild og suboptimera ikki kervið. |

| Atlit 4: Brúkarin, herundir tænastur og prísir | |
|---|---|
| **Fyri** | **Ímóti** |
| **FT:**<br>Verandi integratión millum FT-tænastur og FT sum kervisveitara er besti mátin at tryggja brúkaranum tær ynsktu tænasturnar. Samstundis tryggjar ONP og onnur konsessiónskrøv, at brúkarin samstundis fær valmøguleikar á einum samanberligum grundarlagi við stórum gjógnumskygni. | **Hinir veitararnir:**<br>Alt ov dýrar og vánaligar tænastur, tí kappingin fæst ikki at virka.<br><br>**FSE:**<br>Vandi er fyri, at kappingin verður køvd av FT vegna ójavna á marknaðinum orsakað av einkastøðulíknandi støðuni hjá FT á fleiri økjum. Hetta ávirkar uppá sum frá líður tænastur og prísir skeiva vegin, serliga um kappingin gerst minni. |

| Samandráttur | |
|---|---|
| **Fyri** | **Ímóti** |
| FT metir, at verandi skipan við lógarásetingum um atgeingi og eftirlitsuppgávuni hjá FSE er góð tvs. at verandi skipan er nøktandi eisini við atliti at | Hini veitararnir meta ikki, at verandi skipan gevur eina javna kapping, av tí at FT hevur fyrimunir, og útnyttar hesar til at minka um kappinging. Skipanin hevur við sær, at |

| | |
|---|---|
| kappingini. Tó soleiðis, at FT metir, at broytingar kunna gerast í bygnaðinum og mannagongdum hjá FT við at umskipa deildina, sum hevur havt atgeingi hjá øðrum veitarum um hendi. Endamálið við umskipanini er at hava klárari/greiðari karmar og betri tænastu. | óneyðugar dupultíløgur í kervið verða framdar og atlit til at halda kappingini burtur, tarnar tøkniligu menningini, m.a. av tí at nýggju veitarnir nýta ov stóra orku í atgeingismálum heldur enn til nýskapan.<br><br>FSE metir, at grundleggjandi veikleikar eru í verandi skipan, sum hava við sær, at FT tekur egin atlit fram um og uppfatar kerviskundar fyrst og fremst sum kappingarneytar og minni sum kundar. Hetta hevur við sær, at undirstøðukervið ikki verður fult gagnnýtt. FSE sær fyri sær tann vanda við verandi skipan, at kappingin verður køvd, m.a. av tí at mál um atgeingi hava havt ov tunga málsgongd, og at hetta m.a. ávirkar íløguhugan hjá nýggjum veitarum. |

## Model 2

Kervisparturin av FT verður fluttur í eitt partafelag fyri seg, tó framvegis saman við restini av FT í einum móður/dótturfelagsbygnaði ella øvugt.

**Meting av modellinum**

| **Atlit 1: Kappingarstøða, herundir mobilitetur og gjøgnumskygni** | |
|---|---|
| **Fyri** | **Ímóti** |
| FT:<br>Væntast kann størri gjøgnumskygni.<br><br>**FSE:**<br>Fer væntandi at føra við sær, at kervisfelagið verður ídnari enn verandi FT at selja kervið á jøvnum føti til øll áhugað, íroknað FT. | **Hinir veitararnir:**<br>Óbroytt kappingarstøða samanborið við model 1, tí FT framvegis hevur ræðisrættin til kervispartin. At kervið verður skilt sundur í eitt dótturfelag kann gera ójavnan sjónligari, men FT hevur framhaldandi onga orsøk til annað enn at fasthalda strategisku støðuna. Eitt dømi uppá dótturfelag sum samansjóðaður partur av FT er Televarpið, sum bleiv tikið framum Kall í sambandi við mastrapláss á Støðlafjalli, hóast Kall hevði biðið um hetta (og fingið noktandi svar) 2 ár frammanundan. |
| **Atlit 2: Regulering, herundir stabilir karmar** | |
| **Fyri** | **Ímóti** |
| FT:<br>Roknskaparligu krøvini til FT, bygt upp við einum konsernstrukturi við dótturfeløgum | **Hinir veitararnir:**<br>Óbroytt regulering samanborið við model 1, tí FT framvegis hevur ræðisrættin til kervið. |

| | |
|---|---|
| kann í størri mun enn núverandi virkisøkisroknskap vísa um t.d. ikki loyvdur krosstuðul er ein trupuleiki.<br><br>**FSE:**<br>Vegna størri gjøgnumskygni vil stríðið um at fáa atgeingi gerast minni, og verður mest ein spurningur um at viðgera prísstøðið o.l. | |
| **Atlit 3: Kervið, herundir optimal nýtsla og tøknulig menning** | |
| **Fyri** | **Ímóti** |
| FT:<br>Alt annað líka verða virðini sjónligari, umframt at møguleiki er fyri neyvari fokusering.<br><br>**FSE:**<br>Í mun til verandi FT leggur kervisfelagið seg eftir at optimera kervið. | FT:<br>Samlaði kostnaðurin og fyrisitingin økist. Tískil mugu góðar orsøkir verða til, at umleggja FT til eina konsern við dótturfeløgum.<br><br>**Hinir veitararnir:**<br>Óbroytt samanborið við model 1, tí FT framvegis hevur ræðisrættin til kervispartin. |
| **Atlit 4: Brúkarin, herundir tænastur og prísir** | |
| **Fyri** | **Ímóti** |
| FT:<br>Neyvan broytingar.<br><br>**FSE:**<br>Tá ymiskir veitarar fáa líka atgeingi til kervið, fáa brúkarar væntandi í seinasta enda betri tænastur og lægri prísir. | FT:<br>Neyvan broytingar.<br><br>**Hinir veitararnir:**<br>Líka vánaligar og dýrar tænastur sum í model 1, tí FT framvegis hevur ræðisrættin til kervispartin. |
| **Samandráttur** | |
| **Fyri** | **Ímóti** |
| FT metir, at størri gjøgnumskygni kann væntast við at skipa virksemið í dótturfeløg.<br><br>FSE sær fyri sær, at eitt kervisfelag í størri mun fer at leggja áherðslu á at gagnnýta kervið og harvið at selja kervisatgeingi til allar veitarar. Hetta væntar FSE fer at gagna brúkarunum, av tí at fortreytirnar fyri kapping gerast betur. | Hinir veitararnir meta ikki, at ein skipan við einum kervisfelagi, sum er dótturfelag hjá FT, skapar javnari kapping, av tí at FT framvegis hevur ræðisrættin.<br><br>FSE metir, at feløg innan somu konsern fara at hava lættari atgeingi til kervið.<br><br>FT metir, at fyrisingin fer at økjast, verða dótturfeløg sett á stovn. |

## Model 3

Kervisparturin av FT verður ognarliga sundurskildur frá FT í eitt sjálvstøðugt partafelag, soleiðis at eingi bond formliga knýta feløgini saman framyvir.

Meting av modellinum

| **Atlit 1: Kappingarstøða, herundir mobilitetur og gjøgnumskygni** | |
|---|---|
| **Fyri** | **Ímóti** |
| **Hinir veitararnir:**<br>Jøvn kapping millum fjarskiftisveitarar, sum gevur munandi betur møguleika hjá brúkarum at velja bestu og bíligastu loysina. Orsøkin er, at allir veitarar – í øllum førum á fastnets- og breiðbandsøkinum – hava eins atgeingi til umráðandi fasilitetirnar, uttan at nakar kappingarneyti (t.d. FT) verður blandaður uppí bílegging og veiting. Tað er tó treytað av, at alt fastnetskervið (íroknað access-net, transmissións-net og "telefonnummur") verður við.<br><br>**FSE:**<br>Hetta gevur eitt fullkomið gjøgnumskygni og verða feløgini óheft av hvørjum øðrum. Hetta tryggjar lættari atgeingi hjá nýggjum feløgum, av tí at kervisfelagið ikki skal taka atlit til egnar endabrúkarar. | **FT:**<br>Tann núverandi leikluturin, sum FT hevur sum drívmegi á fjarskiftismarknaðinum, sum garantur fyri, at Føroyar ikki blíva afturúrsigldar, og sum tryggur berari av veitingarskylduni, vil syndrast, og avleiðingarnar eru ikki til at yvirskoða. |

| **Atlit 2: Regulering, herundir stabilir karmar** | |
|---|---|
| **Fyri** | **Ímóti** |
| **Hinir veitararnir:**<br>Lættari regulering enn í model 1 og 2, tí "kervisfelagið" hevur onga orsøk til ikki at samstarva við fjarskiftisveitararnar, sum í model 3 eru kundar og ikki kappingarneytar. Veitingarskyldan endar í kervisfelagnum og tænastufelagið sleppur undan henni.<br><br>**FSE:**<br>FSE fer framhaldandi at regulera kervisfelagið, men er hetta lættari at gera, enn at regulera eitt felag, ið eisini tekur atlit til egnar endabrúkarar. Kervisfelagið verður álagt eina veitingarskyldu. FSE fer at hava færri samtrafikk-mál, av tí at meiri javnvág og gjøgnumskygni er á marknaðinum. Fleiri samtrafikkavtalur skulu tó framhaldandi | **FT:**<br>Sí omanfyri.<br><br>FT metir harumframt, at einhvør "tvangssundurskiljing" av kervi og tænastum hjá einum veitara undirgrevur eitthvørt álit á myndugleikarnar – eisini uppá langt sikt. Harvið gerst tað eisini trupult at fáa til vega nýggjan kapital, antin hetta so er frá lánsveitarum ella sum innskot ígjøgnum eina einskiljing |

| | |
|---|---|
| gerast við FT og krevja hesar framhaldandi eftirlit, sí nærri á s. 32, brot 5.2. | |
| **Atlit 3: Kervið, herundir optimal nýtsla og tøknilig menning** | |
| **Fyri**<br>**Hinir veitararnir**:<br>Verandi fastnetskervi verður optimalt nýtt, tí tað er ikki neyðugt hjá øðrum veitarum at byggja egið kervi. Hetta er nú einans neyðugt, tá verandi kervi ikki røkkur. Tøkniliga menningin økist, tí íløgukrónurnar ikki verða nýttar til dupult-kervi, men heldur til tøkni og tænastur, sum nýta felags kervið.<br><br>**FSE:**<br>Felagið skuldi alt annað líka verið meira motiverað til at fáa selt kervistænastur (enn eitt dótturfelag hjá FT), tí felagið ikki skal taka fyrilit fyri egnum endabrúkarum. Frá almennari síðu verða sett nøkur grundleggjandi veitingarskyldukrøv viðvíkjandi kervinum. FSE ferð eins og nú at hava eftirlit við samtrafikkprísum, atgeingi v.m. og kann gera inntriv um neyðugt. | **Ímóti**<br>**FT**:<br>Sí omanfyri. |
| **Atlit 4: Brúkarin, herundir tænastur og prísir** | |
| **Fyri**<br>**Hinir veitararnir**:<br>Brúkarin fær betri og bíligari tænastur, tí fleiri eru um boðið at bjóða tænastur fram í javnari kapping.<br><br>**FSE:**<br>Útlit til bíligari og betri tænastuveitingar, sum úrslit av jøvnu og stabilu kørmunum á marknaðinum, har fleiri veitarar hava møguleika at gera seg galdandi. | **Ímóti**<br>**FT**:<br>Vandi er fyri, at eingin longur kennir fulla ábyrgd yvirfyri brúkaranum – "Svartiper" verður sendur ímillum kervisfelagið og tænastuveitararnar. Í dag viðurkennir FT sínar skyldur, bæði viðvíkjandi veitingarskylduni og viðvíkjandi brúkarakærum generelt. |
| **Samandráttur** | |
| **Fyri**<br>Hinir veitararnir meta, at um alt fatsnetskervið verður sundurskilt, verður javnari kapping. Eisini verður verandi kervi gagnnýtt, og óneyðugar íløgur verða ikki gjørdar í dupultkerv. Ístaðin økist tøkniliga | **Ímóti**<br>FT metir, at teirra leiklutur sum drívmegi á fjarskiftismarknaðinum verður syndraður við hesum modelli. Eisini sær FT ein vanda í, at eingin kennir ábyrgd yvirfyri brúkarunum og at hesir gerast kastibløka millum |

| | |
|---|---|
| meningin, av tí at íløgurnar tá heldur fara í at menna tøkni og tænastur enn til dupultkervi.<br><br>FSE metir, at hetta modellið gevur betri gjøgnumskygni og vil tryggja atgeingi til allar veitararnar, av tí at kervisfelagið ikki tekur atlit til egnar endabrúkarar. | kervisfelagið og tænastauveitararnar. |

## Model 4

Útyvir at ein heilsøludeild verður sett á stovn (sí model 1), ið yvirtekur tær uppgávur, sum Altjóða- og Samstarvsdeildin hjá FT hevur í dag, verða tey ymisku virkisøkini hjá FT (t.d. Fjarskifti, internet) skild sundur í ymiskar eindir internt í FT.

<u>**Meting av modellinum**</u>

| **Atlit 1: Kappingarstøða, herundir mobilitetur og gjøgnumskygni** | |
|---|---|
| **Fyri** | **Ímóti** |
| **FT**:<br>Sí model 1.<br><br>Tó verður serliga gjøgnumskygni størri, við tað at størri krøv verða sett til skjalprógvan og skrásetan. | **Hinir veitararnir**:<br>Sí model 1.<br><br>**FSE:**<br>Sí model 1. |
| **Atlit 2: Regulering, herundir stabilir karmar** | |
| **Fyri** | **Ímóti** |
| **FT**:<br>Sí model 1. | **Hinir veitararnir**:<br>Sí model 1.<br><br>**FSE:**<br>Sí model 1. |
| **Atlit 3: Kervið, herundir optimal nýtsla og tøknilig menning** | |
| **Fyri** | **Ímóti** |
| **FT**:<br>Sí model 1. | **Hinir veitararnir**:<br>Sí model 1.<br><br>**FSE:**<br>Sí model 1. |
| **Atlit 4: Brúkarin, herundir tænastur og prísir** | |
| **Fyri** | **Ímóti** |

| | |
|---|---|
| **FT:**<br>Sí model 1. | **Hinir veitararnir:**<br>Sí model 1.<br><br>**FSE:**<br>Sí model 1. |
| **Samandráttur** | |
| **Fyri**<br>Viðmerkingarnar eru tær somu sum til model 1, við undantak av, at FT metir, at gjøgnumskygni verður størri, við tað at størri krøv verða sett til skjalprógvan. | **Ímóti**<br>Viðmerkingarnar eru tær somu sum til model 1. |

## Model 5

Tey ymisku virkisøkini hjá FT (t.d. farfjarskifti, internet) verða flutt í ymisk partafeløg, tó framvegis saman við restini av FT í einum móður/dótturfelagsbygnaði.

**Meting av modellinum**

| | |
|---|---|
| **Atlit 1: Kappingarstøða, herundir mobilitetur og gjøgnumskygni** | |
| **Fyri**<br>**FT:**<br>Sí model 2.<br><br>**FSE:**<br>Modellið gevur gjøgnumskygni viðvíkjandi ávísum samtrafikk-avtalum v.m., og P/F Televarpið er væntandi eitt dømi uppá tað. | **Ímóti**<br>**Hinir veitararnir:**<br>Sí model 2.<br><br>**FSE:**<br>Framferðin hjá dótturfeløgunum er framvegis undir eftirlitið hjá og við tilvísing til móðurfelagið, og fara leiðslurnar í dótturfeløgunum hava lyndi til at taka avgerðir samsvarand áhugan hjá móðurfelagnum. Gjøgnumskygni verður tó betri. |
| **Atlit 2: Regulering, herundir stabilir karmar** | |
| **Fyri**<br>**FT:**<br>Sí model 2.<br><br>**FSE:**<br>Reguleringin av grundleggjandi kervinum verður nakað minni av tí, at fleiri "meira javnir" kappingarneytar verða á marknaðinum. Tær samtrafikkavtalurnar, ið | **Ímóti**<br>**Hinir veitararnir:**<br>Sí model 2.<br><br>**FSE:**<br>Áhaldandi tørvur á endurskoðan av samtrafikkavtalum gevur framhaldandi FSE arbeiði. |

| | |
|---|---|
| verða verandi í FT, fara framhaldandi at krevja eftirlit. | |
| **Atlit 3: Kervið, herundir optimal nýtsla og tøknilig menning** | |
| **Fyri**<br>FT:<br>Sí model 2.<br><br>FSE:<br>Betri nýtsla av kervi og meiri gjøgnumskygni enn model 1 og 4, av tí at talan er um fult gjøgnumskygni viðvíkjandi handilsviðurskiftunum millum feløgini, har avroknað verður fyri allar tænastur. | **Ímóti**<br>**Hinir veitararnir**:<br>Sí model 2. |
| **Atlit 4: Brúkarin, herundir tænastur og prísir** | |
| **Fyri**<br>FT:<br>Sí model 2.<br><br>FSE:<br>Betri nýtsla av kervinum og javnari kapping skuldi alt annað líka givið brúkaranum betri tænastur og prísir. | **Ímóti**<br>**Hinir veitararnir**:<br>Sí model 2. |
| **Samandráttur** | |
| **Fyri**<br>Viðmerkingarnar hjá FT eru tær somu sum til model 2.<br><br>FSE metir, at modellið gevur betur gjøgnumskygni – eisini í mun til model 1 og 4 – tí at avroknað verður fyri allar tænastur. | **Ímóti**<br>Viðmerkingarnar hjá hinum veitarunum eru tær somu sum til model 2.<br><br>FSE metir, at leiðslurnar í dótturfeløgum hava lyndi til at taka avgerðir samsvarand áhugan hjá móðurfelagnum. |

## Model 6

Tey ymisku virkisøkini hjá FT (t.d. Fjarskifti, internet) verða ognarliga sundurskild frá FT í sjálvstøðug partafeløg, soleiðis at eingi bond formliga knýta feløgini saman framyvir.

**Meting av modellinum**

| |
|---|
| **Atlit 1: Kappingarstøða, herundir mobilitetur og gjøgnumskygni** |

| Fyri | Ímóti |
|---|---|
| **Hinir veitararnir:**<br>Jøvn kapping millum allar veitarar, íroknað tey feløg, sum FT verður sundurskilt í. Hetta veldst tó um, hvørji virkisøkir verða skild frá, og hvørt kervisparturin verður skildur frá í serstakt felag. Er tað so, at talan t.d. verður um fýra feløg (kervisfelag, farfjarskiftisfelag, alnetsfelag og sjónvarps/fastnetsfelag), so gevur hetta ein heilt nýggjan dynamikk á føroyska fjarskiftismarknaðinum.<br><br>**FSE:**<br>Ymisku samskiftistøknirnar fara meiri eyðsýniliga at kappast við hvørja aðra, og við hesum verður aktivt tikið stig til at "skapa" størri javnvág á endabrúkaramarknaðinum við eini sundurskiljing, ið ger, at tað verða fleiri samskiftisveitarar á marknaðinum. Hetta stigið vil innibera, at einkalíknandi støðan hjá FT, ið er íkomin vegna søguliga einkarættin hjá TFL, verður skerd munandi. | **FT:**<br>Sí model 3. |
| **Atlit 2: Regulering, herundir stabilir karmar** | |
| **Fyri** | **Ímóti** |
| **Hinir veitararnir:**<br>Lættari regulering enn í model 4 og 5, tí kervisfelagið hevur onga orsøk til ikki at samstarva við fjarskiftisveitararnar, sum í model 6 eru kundar og ikki kappingarneytar. Veitingarskyldan endar í kervisfelagnum og hini feløgini sleppa undan henni. Tað er týdningarmikið, at tiltøk verða gjørd, soleiðis at sundurskildu feløgini eins og aðrir veitarar ikki ótálmað kunnu leggja saman ella á annað hátt úthola kappingina.<br><br>**FSE:**<br>Eftir hesum modellinum fáa Føroyar eitt sera virkið umhvørvi innan fjarskifti. FSE metir, at javnari kappingini er, so verða útlitini til minni regulering bæði innan samtrafikk og brúkaraprísir. | **FT:**<br>Sí model 3. |
| **Atlit 3: Kervið, herundir optimal nýtsla og tøknilig menning** | |
| **Fyri** | **Ímóti** |

| | |
|---|---|
| **Hinir veitararnir:**<br>Verandi fastnetskervi verður optimalt nýtt, tí aðrir veitarar nýtast ikki at byggja egið kervi, har kervið hjá kervisfelagnum longu røkkur. Tøkniliga menningin økist, tí íløgukrónurnar verða ikki nýttar til dupult-kervi, men til tøkni og tænastur, sum útnytta felags fastnetskervið, umframt nýskapandi kervi, har tað er hóskandi.<br><br>**FSE:**<br>Kerviskervið og onnur kervi sum t.d. farfjarskifti og Televarpið koma í beinharða kapping við hvørt annað. Nýggja kervisfelagið fær ikki sterka einkarættarstøðu, um so er, at fleri sterkir tænastuveitarar (kerviskundar) eru á marknaðinum. Samstarvið millum kervisfelagið og tænastuveitararnar ger, at ein menning fer fara fram av kervinum, samstundis sum kervisfelagið fær ein nøktandi vinning. | **FT:**<br>Sí model 3. |
| **Atlit 4: Brúkarin, herundir tænastur og prísir** | |
| **Fyri** | **Ímóti** |
| **Hinir veitararnir:**<br>Brúkarin fær betri og bíligari tænastur, tí fleiri eru um boðið at bjóða tænastur fram í javnari kapping.<br><br>**FSE:**<br>Ein marknaður, har fleiri virkin feløg eru, sum kappast bæði beinleiðis og óbeinleiðis við samskiftistænastum, fer seinri at gagna marknaðinum og menningini av tænastum til brúkarnar, umframt betra um prísirnar. | **FT:**<br>Sí model 3. |
| **Samandráttur** | |
| **Fyri** | **Ímóti** |
| Hinir veitarnir meta, at hetta modellið gevur javna kapping. Fyribyrgjast má, at sunduskildu feløgini og aðrir veitarar ikki ótálmað kunna leggja saman.<br><br>FSE metir, at hetta modellið skapar meiri javnvág, og at nýggja kervisfelagið ikki fær | FT hevur somu viðmerkingar sum til model 3. |

| | |
|---|---|
| eins sterka einkarættarstøðu, um so er, at fleiri sterkir tænastuveitarar eru á marknaðinum. | |

## Samandráttur

Viðgerðin av modellamboðnum hjá nevndini hevur víst, at stórur munur er á metingunum hjá ávíkavíst FT, hinum veitarunum og Fjarskiftiseftirlitinum. Tabellin niðanfyri vísir við myndum, hvussu hesar metingar hava verið. Trý ymisk andlit vísa, hvat hvør partur heldur um tey seks modellini, ið vórðu uppstillað. Andlitini vísa, at modellið verður hildið at vera:

☺ gott, 😐 minni gott, ☹ vánaligt

**Samandráttur av metingunum um tey 6 modellini, ið sett eru upp í frágreiðingini:**

| | | Heilsøludeild á kervisstøðuni | Sundurskilјing í móður/dótturfeløg | Ognarlig sundur-skilјing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Model 1** | **Model 2** | **Model 3** |
| **Sundurskilјing funktionelt / teknologist (kervi)** | **FT** | ☺ | 😐 | ☹ |
| | **Hinir veitararnir** | ☹ | ☹ | ☺ |
| | **FSE** | ☹ | 😐 | ☺ |
| | | **Model 4** | **Model 5** | **Model 6** |
| **Sundurskilјing í virkisøkir (t.d. mobil, internet)** | **FT** | ☺ | 😐 | ☹ |
| | **Hinir veitararnir** | ☹ | ☹ | ☺ |
| | **FSE** | ☹ | 😐 | ☺ |

Á talvuni omanfyri sæst, at einki modell verður hildið at verða tað besta av øllum pørtunum. Tey modell (nr. 1 og 4), ið FT heldur vera nøkur *góð* model, verður av "hinum veitarunum" og FSE hildið at vera nøkur *vánalig* modell. Hinvegin sæst eisini, at tey modell (nr. 3 og 6), sum "hinir veitararnir" og FSE halda vera nøkur *góð* model, verður av FT hildið at vera nøkur *vánalig* model. Herviđ sæst eisini, at "hinir veitarnir" og FSE hava nøkunlunda somu áskoðan.

Niðurstøðan av greiningini av metingunum hjá pørtunum til tey seks modellini omanfyri er sostatt, at áskoðanin hjá "hinum veitarunum" og Fjarskiftiseftirlitinum so at siga er beint tvørtur ímóti áskoðanini hjá FT. Tað einasta, ið allir partarnir eru samdir um, er, at model 2 og 5 eru nøkur *minni góð* model.

## Appendiks B: Søgulig lýsing av lógarverkinum innan fjarskifti

- Við Lov nr. 84 af 11.05.1887 om Telegrafer og telefoner fekk danski staturin einkarætt til at reka telefon og telegraf í øllum ríkinum.

- 20. mai 1906 samtykti Løgtingið, at tingið skuldi standa fyri og reka telefon um alt landið, og danski staturin veitti konsessión 7. september 1906 til Færøernes Amtskommunes Telefonvæsen, sum stóð fyri at leggja telefonlinjurnar, ið byrjaði sama ár.

- 19. november 1906 varð byrjað at avgreiða telefonsamrøður í Føroyum.

- Við gildiskomu 1. juli í 1997 varð málsøkið fjarskifti yvirtikið við undantøku av radiosamskifti og radiogrundaðu neyð- og trygdartænastuni á havinum.

- 1. januar 1998 varð partafelagið Telefonverk Føroya stovnað.

- Undantiknu økini innan málsøkið fjarskifti vórðu yvirtikin ávíkavist 1. januar 2002 (radiosamskifti) og 1. februar 2002 (radiogrundaða neyð- og trygdartænastan á havinum).

- Í sambandi við yvirtøkuna av radiofjarskiftisøkinum er broyting av fjarskiftislógini samtykt og kom í gildi 1. januar 2002. Í lógini eru nú radiosamskifti og fjarskifti savnað í einari lóg. Harumframt er komin áseting um, at veitarar hava skyldu til fyri marginalan kostna at geva avrit av nummarupplýsingum.

- Við Ll. nr. 79 frá 23. mai 1997 um fjarskifti, við seinni broyting í Ll. nr. 176 frá 21. desember 2001 varð leiðin opna fyri, at aðrir fjarskiftisveitarar kundu virka á føroyska marknaðinum.

- Kunngerð nr. 108 frá 7. september 2000 um kærunevnd í fjarskiftismálum.

- Kunngerð nr. 20 frá 14. marts 2002 um frekvens (tíddar)- og avgreiðslugjøld á radiosamskiftisøkinum fyri 2003.

- MB. nr. 40 af 27.11.1940 for Færøerne om foranstaltninger mod forstyrrelse af radiomodtagning.

- Kunngerð. nr.1 frá 01.01.1957 viðvíkjandi útvarpsóljóði.

- L. nr. 279 af 15.05.1946 om hindring af forstyrrende radiobølger.

- Reglugerð frá 1. mars 2002 um alment loyvi til tráleyst fjarskifti í ávísum frekvensøkjum (tíddarøkjum). Reglugerð frá 8. mars 2002 um uppseting, nýtslutøku og brúk av radioútbúnaði í siglinga radiotænastum og loftferðslutænastum við einstaklingsloyvi til frekvensnýtslu (tíddarnýtslu)

- Reglugerð frá 15. mars 2002 um treytir at nýta radioútbúnað í radiotænastu á sjónum. (siglingaradiopróvbrøv)

- Reglugerð frá 18. desember 2002 um áhugavarping vm.

- Reglugerð frá 20. desember 2002 um uppseting, nýtslutøku og brúk av radioútbúnaði til radio- og radiofylgisveinatænastu fyri áhugavarparar við einstaklingsloyvi til frekvensnýtslu (tíddarnýtslu)

## *Appendiks C: Konsessiónir*

Higartil eru hesar koncessiónir (fjarskiftisloyvi) veittar av landsstýrismanninum sambært § 8 í fjarskiftislógini:

### Koncessiónir á fyrsta stigi (kringvarpsvirksemi)

1. Sp/f Rás 2 (útvarp og sjónvarp) — www.ras2.fo
2. Sjálvsognarstovnurin Lindin (útvarp) — www.lindin.fo
3. Suðurrás (útvarp) (óvirkin)
4. Sp/f Kervi (sjónvarp) (óvirkin)
5. Sp/f Camelot (sjónvarp) (óvirkin)

### Koncessiónir á øðrum stigi (eigarafeløg o.l.)

Koncessión til at reka og veita avmarkaða fjarskiftistænastu og fjarskiftiskervi í avmarkaðum øki (kaðal- og loftborið transmissionskervi, kringvarpskervi, (hybridnet), internettænastu.

1. Eigarafelagið Millum Gilja / Oman flat
2. Eigarafelagið Inni á Gøtu
3. Eigarafelagið Norðasta Horn
4. SITA Airline Communications
5. Tykissamfelag Svínoy – Fugloy
6. Eigarafelagið Lítla Gil/Eystan Løgmannabreyt
7. Eigarafelagið Undir Brúnni
8. Rás Gjógv

### Koncessiónir á triðja stigi

Innanlands telefonitænastur - leigulinjur innlanda, tekst- og dátasamskiftistænastur, fylgisveinatænastur og aðrar virðisskapandi tænastur, íroknað internettænastur (Telefonstøðir ikki íroknaðar).

1. Teletech — www.teletech.fo
2. El&Tele — www.eltele.fo
3. Farodane — www.farodane.fo (óvirkin)
4. formula.fo — www.formula.fo (óvirkin)
5. Atlantic Online — www.atlanticonline.com
6. Hansoft — www.hansoft.fo
7. Televarpið — www.televarp.fo
8. Auxilior — www.auxilior.com (óvirkin)
9. KT-felagið — www.industry.fo
10. Datanet — www.datanet.fo
11. Farice Hf. — www.farice.fo
12. MRCC Tórshavn — www.mrcc.fo
13. Vikmar — www.vikmar.fo

### Koncessiónir á fjóra stigi

Vanliga triðjastig og íroknað telefonstøðir.

1. Teletænastan — www.teleserve.fo

## Koncessiónir á fimta stigi

Triðja, fjóra og møguliga fyrsta stig, umframt farfjarskiftiskervi og tænastur.

1. FT
2. Føroya Tele          www.tele.fo
3. 2. Kall          www.kall.fo